Landsbanki Føroya

# 2024

# Fíggjarpolitiskt haldføri

Arbeiðsnotat

# Innihaldsyvirlit


**1. INNGANGUR** 3

**2. MYNDLASKIPAN** 4

2.1 Formyndlar og dátugrundarlag 5

2.2 Fólkatalsframrokning og íbúgvaroknskapur 5

2.3 Almennar inntøkur og útreiðslur, einstaklingakostnaður 12

2.3.1 Tjóðarroknskapur 20

2.4 Makrobúskaparligur myndil 21

2.5 Haldførisávísi 26

**3. SAMLÁT** 28

3.1 Grundframlit 28

3.1.1 Gongd í fólkasamanseting og arbeiðsvirkni 28

3.1.2 Makrobúskaparlig gongd 29

3.2 Gongd í inntøkum og útreiðslum 31

3.3 Alternativ framlit 33

3.3.1 Hækka pensjónsaldurin ½ ár fimta hvørt ár 33

3.3.2 Hækka pensjónsaldurin 1 ár fimta hvørt ár 34

3.3.3 Seta nettofráflyting til null 35

3.3.4 Einstaklingakostnaður til aldurdóm fellur 20% 37

**4. AVMARKINGAR OG FYRIVARNI** 39

**5. ÚTGANGUR** 43

Keldulisti 44

Yvirlit yvir talvur og myndir 46

# Inngangur

Greiningin hjá Búskaparráðnum av fíggjarpolitiska haldførinum hevði til endamáls at kanna, um førdi fíggjarpolitikkurin er haldførur. Tað vil siga, hvørt tænastustøðið á vælferðarøkinum kann bjóðast í framtíðini, hóast vaksandi talinum av eldri. Úrslitið í frágreiðingini um fíggjarpolitiska haldførið var, at fíggjarpolitikkurin ikki er haldførur og at nýskipanir mugu gerast. Í hesum tekniska fylgiskjali verður nærri lýst, hvørjar fortreytir liggja handan haldførisgreiningina, hvørjir myndlar liggja til grund, og hvussu komið er fram til haldførisávísan. Talan er um fyrstu útgávu av haldførsmyndlinum, sum framvegis er undir menning.

Fylgiskjalið verður skipað á fylgjandi hátt: fyrsti kapittul lýsir myndlaskipanina. Fyrst verða formyndlarnir lýstir. Hesir eru fólkatalsframrokningin, íbúgvaroknskapurin og almennar inntøkur og útreiðslur, og undir hesum eisini einstaklingakostnaður. Endamálið er at greina samansetingina av búfjøldini og nágreina arbeiðsmarknaðarstøðuna, umframt at kanna, hvussu nógv búfjøldin kostar býtt á aldursbólkar í ymsum almennum tænastum.  Høvuðsdátakeldan er tjóðarroknskapurin; millum annað COFOG útreiðslur (sum er ein OECD klassifisering av almennum útreiðslum eftir endamáli), og input-output talvur. Harafturat eru fleiri aðrar keldur, ið eru nýttar til at gera íbúgvaroknskapin og einstaklingakostnaðin.

Næst verður makrobúskaparligi myndilin lýstur, ið er ein CGE myndil[1] fyri samlaða búskapin við serligum atliti til langskygdar haldførisgreiningar. Myndilin er mentur av granskingarstovninum Dream og er ein einfaldari útgáva av DREAM myndlinum (Danish Rational Economic Agent Model), ið upprunaliga er mentur til grønlendska búskapin, men sum Landsbankin hevur tillagað føroyska búskapin. Myndilin er hagfrøðiliga grundaður á føroyska tjóðarroknskapin og lýsir húsarhaldini, fyritøkurnar, almenna geiran og eftirspurningin frá útlandinum. Í hesi fyrstu útgávu hevur verið miðað eftir, at myndilin er so einfaldur sum til ber, og tó lýsir føroyska búskapin á nøktandi hátt. Makrobúskaparligi myndilin er liður í at kunna útrokna haldførisávísan. Síðani verða úrslitini frá nøkrum samlátum (simulatiónum) lýst. Dentur verður í høvuðsheitum lagdur á grundframlitið frá haldførisgreiningini. Grundframlitið er tá ið fólkatalsframrokningin hjá Hagstovu Føroya verður nýtt og pensjónsaldurin hækkar til 67,5 ár í 2025 og til 68 ár í 2030 – við øðrum orðum, tann galdandi samtykti pensjónsaldurin. Hugt verður millum annað at búskaparliga forsyrgjarabrøkinum, liðunum í veitingarjavnanum, og almennum inntøkum og útreiðslum yvir framrokningartíðarskeiðið. Samlát av alternativ framlitum verða lýst í stuttum. At enda verður tikið samanum, og fyrivarni og veikleikar verða lýstir. Talan er um fyrstu útgávu av haldførismyndlinum og tað verður framvegis arbeitt við at menna bæði formyndlar og at tillaga makrobúskaparliga myndilin. Í fyrstu atløgu hevur høvuðsdentur verið lagdur á at framleiða formyndlar, ið avspegla føroysk viðurskiftir.

Landsbanki Føroya røkir skrivara-  og greiningauppgávur Búskaparráðsins og hevur ment haldførismyndilin og staðið fyri øllum myndlatøkniskum avgerðum.

---

[1] Computable General Equilibrium model eru stórir myndlar, sum samantvinna búskaparliga ástøði við veruligar búskaparligar dátur fyri at koma fram til ávirkanir av ymiskum politiskum raðfestingum og búskaparligum stoytum í búskapinum.

# 1. Myndlaskipan

Haldførismyndilin gevur eina mynd av framtíðar inntøkunum og útreiðslunum hjá almenna geiranum. Myndilin tekur støði í vælferðartænastunum, almennu veitingunum og skattaskipanunum, sum tær vóru í støðisárinum 2018, og framskrivar almennu útreiðslurnar og inntøkurnar eftir, hvussu fólkatalið broytist. Við tíðini fara vit at verða lutfalsliga fleiri eldri fólk í mun til tey í arbeiðsførum aldri.

Haldførismyndilin byggir á fleiri myndlar, bæði formyndlar og ein makrobúskaparligan myndil. Myndlaskipanin, ið er grundarlagið fyri útrokningini av haldførisávísanum, er teknað í mynd 2.1.1 niðanfyri á ein einfaldan hátt:

**Myndlaskipanin** **Mynd 2.1.1**




Haldførismyndilin tekur støði í eini framrokning av fólkatalinum, sum eisini er sett saman við einum íbúgvaroknskapi. Saman eru fólkatalsframrokningin og íbúgvaroknskapurin grundarsteinar fyri at framrokna sosiobúskaparligu støðuna hjá búfjøldini. Sosiobúskaparliga framrokningin verður saman við einstaklingakostnaði, almennum inntøkum og útreiðslum frá støðisárinum 2018, umframt input-output talvum og øðrum tjóðarroknskaparligum hagtølum, nýtt sum input til makrobúskaparliga myndilin. Makrobúskaparligi myndilin roknar fram millum annað BTÚ, privata nýtslu, uttanlandshandil og allar almennar útreiðslur og inntøkur, og lýsir at enda gongdina í almennu úrslitunum.

Í hesum kapitlinum verður greitt frá allari myndlaskipanini. Fyrst og fremst blíva formyndlarnir lýstir, tað eru fólkatalsframrokningin og íbúgvaroknskapurin. Almennar inntøkur og útreiðslur, einstaklingakostnaður og tjóðarroknskaparligar støddir verða síðani lýstar. At enda verður stutt greitt frá makromyndlinum, kalibrering og haldførisávísanum.

# 1.1 Formyndlar og dátugrundarlag

Dátur og hagtøl, sum eru grundarlag fyri eitt nú formyndlum, stava frá ymsum keldum. Ein høvuðskelda er tjóðarroknskaparuppgerðin hjá Hagstovu Føroya. Aðrar talvur frá hagtalsgrunninum hjá Hagstovu Føroya verða eisini nýttar; eitt nú fólkatal, vinnutíttleiki og arbeiðsloysi. Dátur eru harumframt fingnar til vega frá ymiskum almennum stovunum, millum annað almannaverkinum, Tórshavnar kommunu, ávísum eldrasamstørvum, Studna og Útbúgvingarstýrinum.

# 1.2 Fólkatalsframrokning og íbúgvaroknskapur

## Fólkatalsframrokning

Fólkaframrokningin í grundframlitinum byggir á fólkatalsframrokningina hjá Hagstovu Føroya. Nýggjasta dagføring av fólkatalsframrokningini hjá Hagstovu Føroya er frá 2022.[2] Fólkatalsframrokningin er gjørd við støði í føði- og deyðatíttleikanum og til- og fráflytingini síðani 1985 og framroknar fólkatalið fram til 2062. Alternativ framlitini byggja harumframt á eina sundurlutan (dekomponering) av liðunum í fólkatalsframrokningini, sum er gjørd í samstarvi við ráðgevarafyritøkuna Deloitte.

Fólkatalsframrokningin er grundað á ein stokastiskan myndil, har mettu støddirnar eru grundaðar á søguligar dátur og rák. Sum heild eru framrokningar við so longum tíðarkarmi merktar av stórum óvissum. Yvirskipað taka útrokningarnar útgangsstøði í hesum samanhangi fyri hvørt ári, sum víst í niðanfyristandandi mynd 2.1.2:

**Fólkatalsframrokning** **Mynd 2.1.2**




Føðitíttleikin er tal av livandiføddum børnum fyri hvørji 1.000 konufólk, og deyðatíttleiki er tal av deyðum fyri hvørjar 1.000 íbúgvar. Nettotilflyting er munurin millum tilflyting og fráflyting. Fólkatalið verður framroknað fyri 1-ára aldursbólkar og fyri hvørt kyn. Mynd 2.1.3a, b, c og d lýsa gongdina í fólkatalinum, nettotilflyting, føðitíttleika, bæði søguliga og framroknað.

Føðitíttleikin er grundaður á føroysk hagtøl, meðan deyðatíttleikin byggir á norsk hagtøl. Orsøkin til, at føroysk hagtøl ikki verða nýtt fyri deyðatíttleikan er, at ov fáar eygberingar eru, og tískil sveiggja tølini ov nógv frá ári til ár í føroysku tølum. Deyðatíttleikin í Noreg líkist søguliga tí føroyska.

[2] Hagstova.fo, https://hagstova.fo/fo/folk/folkatal/framrokning.

Framroknaði føðitíttleikin er grundaður á søguliga føðitíttleikan, og verður settur til 2,3 í hvørjum ári. Á mynd 2.1.1c sæst, at tá ið føðitíttleikin var hægst, var hann 2,8. Seinnu árini er føðitíttleikin fallin, og í 2023 var hann niðri á 1,9. Tá samanborið verður við rákið við fallandi føðitíttleika bæði í Føroyum og øðrum londum í vesturheiminum, kann hugsast, at háttalagið førur til, at metingin av føðitíttleikanum í framrokningini helst er í hægra lagi.

Árliga nettofráflytingin, sum fólkatalsframskrivingin roknar út, broytist á hvørjum ári, tá ið nýggjar dátur leggjast aftrat í myndlinum. Dagførda fólkatalsframskrivingin hevur, vegna stóru tilflytingarnar seinastu árini, eina munandi lægri árliga nettofráflyting í mun til tað, sum haldførisgreiningin hjá Búskaparráðnum frá 2015 hevði.

Tað hava verið stór sveiggj í nettoflytingini millum útlond og Føroyar hesi seinastu 35 árini, ið bendir á, at føroyska búfjøldin, í øllum førum søguliga sæð, hevur verið rættiliga flytfør. Hetta ger tað torført at gera eina eintýdda meginreglu fyri fólkatilflytingina í framtíðini. Í fólkatalsframrokningini hjá Hagstovu Føroya eru útlit til eina árliga nettofráflyting fram í tíð, hóast ein lutfalsliga stór nettotilflyting hevur verið til Føroya síðani 2014, umframt í einum stuttum tíðarskeiði aftaná kreppuna í nítiárunum. Fólkaflytingar í Føroyum tykjast at hava tætt samband við konjunkturar og arbeiðsloysi. Um framrokningarnar skulu betrast, er neyðugt við serstøkum myndlum fyri til- og fráflyting, umframt betri fatan av tí, sum drívur fólkaflytingar í Føroyum.[3] Nettotilflytingin seinastu tvey árini stavar bert frá útlendingum. Hetta er eitt nýtt fyribrigdi, ið átti at verið kannað nærri. Flytimynstur og sosiobúskaparligur profilur hjá útlendingum, sum flyta til Føroyar einans fyri at arbeiða, nýtist ikki at vera hin sami, sum hjá føroyingum. Tað hevði tískil verið áhugavert í framtíðini at greina hvørja ávirkan tað hevði havt á fólkatalið, um útlendska búfjøldin, ið kemur til Føroya við arbeiðsloyvi, hevði verið viðgjørd serskilt í fólkatalsframrokningini.

Fyri at kunna broyta uppá teir ymsu liðirnar í fólkatalsframrokningini, ið vísir, hvørja ávirkan hvør liður hevur á fólkatalið og aldursamansetingina hjá búfjøldini, hevur Landsbanki Føroya í samstarvi við Deloitte endurskapt fólkatalsframrokningina hjá Hagstovu Føroya, soleiðis at tað ber til at stilla liðirnar: nettotilflyting, deyðatíttleiki og føðitíttleiki til ymisk framlit. Hetta gevur møguleika fyri at gera viðkvæmisgreiningar av broytingum í annaðhvørt nettoflyting, yvirlivingartíttleika og føðitíttleika, og kanna, hvussu hesar støddir ávirka fíggjarpolitiska haldførið.

Sum nevnt omanfyri er nettoflytingin torfør at framrokna orsakað av flytførinum hjá búfjøldini. Á mynd 2.1.3b (bláa strikan) sæst, at  søguliga gongdin í til- og fráflyting, hevur ta ávirkan, at fólkatalsframrokningin í síni heild metir eina nettofráflyting á umleið 50 fólk í miðal í framrokningartíðarskeiðinum. Í frágreiðingini um fíggjarpolitiska haldførið er ein viðkvæmisgreining gjørd, har nettofráflytingin verður sett til 0 (sí reyðu strikuna í mynd 2.1.3a og b), og tað merkir at fólkatalið veksur í framrokningini.

[3] Sí Búskaparráðið (2019), s. 49

**Framroknað fólkatal** **Mynd 2.1.3a**




**Nettotilflyting** **Mynd 2.1.3b**




**Føðitíttleiki** **Mynd 2.1.3c**




**Yvirlivingartíttleiki** **Mynd 2.1.3d**




Kelda: Hagstova Føroya, Landsbanki Føroya og Deloitte.

## Íbúgvaroknskapur

Íbúgvaroknskapurin verður nýttur til at áseta støddina av ávikavist teimum, sum eru í arbeiðsfjøldini og teimum, sum eru uttanfyri arbeiðsfjøldina (vinnuliga óvirkin) í viðgjørda tíðarskeiðinum. Harumframt verður íbúgvaroknskapurin nýttur til at áseta hvørjir íbúgvar fáa eina almannaveiting. Allir íbúgvar fáa tillutað eina sosiobúskaparliga støðu og veitingarstøðu. Um fólkið er partur av arbeiðsfjøldini, fær viðkomandi arbeiðsmarknaðarstøðuna 1, og um viðkomandi er uttanfyri arbeiðsfjøldina, fær viðkomandi støðuna 0. Um fólkið harumframt fær eina almannaveiting, fær viðkomandi veitingarstøðu 1 (og 0 um viðkomandi ikki móttekur almenna veiting). Talva 2.1.1 vísir bygnaðin á íbúgvaroknskapinum og eitt stutt yvirlit yvir keldur og viðgerðir av keldudátum.

**Íbúgvaroknskapur** **Talva 2.1.1**

| | Sosiobúskaparlig støða | Viðgerð | Kelda | Inntøku veitingar | Viðgerð | Kelda |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Arbeiðsfjøldin** | Arbeiðsvirkin | *Funktión av arbeiðsfjøldini (Øll yvir 15, ið ikki eru arbeiðsleys ella vinnuliga óvirkin)* | IB09010 | | | |
| | Arbeiðsleys | *Miðal arbeiðsloysi 2006-2023M7, deilt á kyn og 10 ára aldursbólkar* | AM02021 | ALS | *006881 Arbeiðsloysistryggingin (COFOG 2018) deilt við miðaltalið av arbeiðsleysum í 2018* | COFOG 2018 |
| **Vinnuliga óvirkin** | Børn yngri enn 16 ár | *16 ára gomul, ið ganga í 10'inda flokki vera definera sum børn. Undirvísingarstýrið hevur hagtøl yvir næmingar í 10'inda flokki.* | IB09010, undivísingarstýrið | | | |
| | Lesandi á miðnámi | *Tal av lesandi frá leiðslukunningarskipanin, deilt á aldur við hagtølum frá Studna* | Útbúgvingarstýrið, Studni, Leiðslukunningarskipanin | Studningur (til miðnám) | *Summur av útgoldnum studningi í 2018 (studni) deilt við tal av móttakarum av studningi (Studni)* | Studni |
| | Lesandi hægri lestur | *Tal av lesandi frá leiðslukunningarskipanin, deilt á aldur við hagtølum frá Studna* | Útbúgvingarstýrið, Studni, Leiðslukunningarskipanin, Fróðskaparsetur Føroya | Studningur (til hægri útbúgving) | *Summur av útgoldnum studningi í 2018 (studni) deilt við tal av móttakarum av studningi (Studni)* | Studni |
| | Barnsburðarfarloyvi | *Miðaltal av barnsburðarfarloyvum 2017-2022* | Taks | Barnsburðarpengar frá barsilsskipanini | *135575 Barsilsskipan (COFOG 2018) deilt við tal av móttakarum av barsilsgjødlum í 2018* | COFOG 2018, Taks |
| | Fyritíðarpensjónistar | *Residualbólkur. Tey, ið eru vinnuliga óvirkin, ið ikki eru pensjónistar, børn, lesandi ella í barnsburðarfarloyvi* | | Fyritíðarpensjón (høga, miðal ella láa) | *132542 Hægsta fyritíðarpensjón, 134064 Miðal fyritíðarpensjón og 138040 Lægsta fyritíðarpensjón (COFOG 2018) deilt við tal av móttakarum av fyritíðarpensjónum (AV) í 2018* | COFOG 2018, Almannaverkið |
| | Pensjónistar | *Øll ið hava pensjónsaldur* | IB09010 | Fólkapensjón og AMEG (arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin) | *124801 Fólkapensjón og 006871 Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnur (COFOG 2018) deilt við tal av móttakarum av fólkapensjónum* | COFOG 2018, Almannaverkið |

Arbeiðsfjøldin verður býtt í arbeiðsvirkin og arbeiðsleys. Fólk sum eru arbeiðsleys, eru partur av arbeiðsfjøldini, ið kemur av, at tey eru tøk á arbeiðsmarknaðinum. Øll børn undir 16 ár og allir íbúgvar, ið hava rokkið pensjónsaldur, verða roknað sum uttanfyri arbeiðsfjøldina í myndlinum. Við hagtølum frá Útbúgvingarstýrinum, Studna, og Taks, verður mett um strukturella lutfallið av lesandi og kvinnum í barnsburðarfarloyvi í mun til fólkatalið. Fyritíðarpensjónistar er ein avlopsbólkur, tað vil siga, at tá ið talið av fólki í ávikavist arbeiðsfjøldini og talið av vinnuliga óvirknum, sum ikki eru fyritíðarpensjónistar, er avgjørt, verða tey, sum ikki hava aðra sosiobúskaparliga støðu, í myndlinum roknað sum verandi fyritíðarpensjónistar.

Endamálið við at gera ein íbúgvaroknskap, har allir íbúgvar hava eina sosiobúskaparliga støðu, er at síggja, hvussu demografiskar broytingar ávirka støddina á arbeiðsfjøld og vinnuliga óvirknum, umframt at fáa greiðu á, hvussu nógvir íbúgvar væntast at fara at móttaka almannaveitingar í framtíðini. Íbúgvaroknskapurin verður eisini nýttur, tá ið almennu útreiðslurnar, til millum annað almannaveitingar og einstaklinga útreiðslur verða roknaðar fram í tíð, og tá ið almennu inntøkurnar av inntøkuskatti verða

framroknaðar. Myndirnar 2.1.4a, b, c og d vísa tal av fólki við hvørjari einstakari sosiobúskaparligari støðu býtt á aldur í ávikavist 2024 og 2060. Mynd 2.1.4b, c og d eru ymiskar á tann hátt, at pensjónsaldurin ikki er hin sami. Á myndunum sæst, hvussu talið av pensjónistum, fyritíðarpensjónistum og arbeiðsfjøld broytist, so hvørt sum pensjónsaldurin broytist (markið fyri nær man røkkur pensjónsaldur hækkar).

**2024 Íbúgvaroknskapur** **Mynd 2.1.4a**

*Samtyktur pensjónsaldur*




**2060 Íbúgvaroknskapur** **Mynd 2.1.4b**

*Samtyktur pensjónsaldur*




**2060 Íbúgvaroknskapur** **Mynd 2.1.4c**

*Pensjónsaldur hækkar hálvt ár, 5. hvørt ár*




**2060 Íbúgvaroknskapur** **Mynd 2.1.4d**

*Pensjónsaldur hækkar 1 ár, 5. hvørt ár*




Kelda: Landsbanki Føroya

Neyðugt er at bólka búfjøldina, tá framroknað verður, og nakrir vansar eru við tí. Eitt nú ber ikki til hjá fólki at hava fleiri sosiobúskaparligar støður, til dømis at verða lesandi og arbeiða, ella pensjónistur og arbeiða. Í fyrstu atløgu hava øll, sum hava rokkið pensjónsaldur, fingið sosiobúskaparligu støðuna pensjónist, hóast summir pensjónistar arbeiða. Tað er tó torført at gera nakra væl grundaða meting av

støddini á hesi ávirkan í verandi løtu. Ætlanin er í framtíðini at gera eina neyvari greining av, hvussu nógv pensjónistar arbeiða, fyri síðani at fáa nýggju vitanina og tølini við í haldførismyndilin.

## Vinnutíttleiki

Vinnutíttleikin avger lutfallið av arbeiðsvirknum í íbúgvaroknskapinum, tó undantikið fyri 16-35 ára gomul. Vinnutíttleikin hjá hesum aldursbólkinum er sera høgur, hóast sannlíkt er, at stórur partur av teimum eru fulltíðarlesandi, og tí helst bert hava eitt parttíðarstarv. Fólk millum 16-35 ár, sum eru lesandi, verða í íbúgvaroknskapinum sett at verða fulltíðarlesandi, og tískil fer lutfallið av arbeiðsvirknum í aldrinum 16-35 ár verða lægri, enn uppgjørdi vinnutíttleikin hjá Hagstovu Føroya.

Vinnutíttleikin vísir, hvussu stórur partur av teimum, sum eru í arbeiðsførum aldri, eru ein virkin partur av arbeiðsfjøldini. Á mynd 2.1.5 er føroyski vinnutíttleikin býttur á aldursbólkar í útvaldu árunum 2006, 2012, 2018 og 2023. Vinnutíttleikin hevur ligið áleið á sama støði gjøgnum alt tíðarskeiðið; sløk 90%. Aldursbýtti vinnutíttleikin hevur yvirskipað verið fallandi fyri yngru aldursbólkarnar í tíðarskeiðinum. Fyri tey 15-19 ára gomlu er vinnutíttleikin fallin úr 81% í 2006 til 75% í 2023, og fyri tey 25-29 ára gomlu, er hann fallin úr 94% í 2006 til 87% í 2023. Gongdin er øðrvísi fyri eldru ættarliðini, har vinnutíttleikin er farin úr 80% í 2006 til 87% í 2023 fyri 60-64 ára gomul, og úr 38% 2006 til 50% í 2023 fyri 65-74 ára gomul.

**Aldursbýttur vinnutíttleiki, í árstali** **Mynd 2.1.5**




Kelda: Hagstova Føroya

Hóast vinnutíttleikin gevur eina mynd av, hvussu nógv í búfjøldini eru arbeiðsvirkin, eru ávís ivamál um, hvørt vinnutíttleiki er besta amboðið at meta um arbeiðsluttøku. Vinnutíttleikin tekur ikki atlit til, hvussu nógv verður arbeitt, tí øll, sum arbeiða meir enn ein tíma, verða mett at vera arbeiðsvirkin, og tí geva hagtølini bert eina meting um, hvørt arbeitt verður í heila tikið, men ikki hvussu nógv. Ætlanin er at menna og nágreina arbeiðsvirknið í haldførismyndlinum, so hvørt nýggj viðkomandi arbeiðsmarknaðarhagtøl verða ment.

Av tí, at talið av arbeiðsvirknum er grundað á vinnutíttleika, er arbeiðsvirknið allarhelst yvirmett. Hinvegin verða øll, sum hava rokkið pensjónsaldur, koyrd av arbeiðsmarknaðinum, og tað er við til at undirmeta arbeiðsvirknið. Høgi vinnutíttleikin hjá 65-74 ára gomlum týðir á, at nógvir pensjónistar arbeiða. Tað er tó ringt at meta um, hvussu nógv tey arbeiða, við bert at hyggja at vinnutíttleikanum. Í 2020 gjørdist tað møguligt at útseta pensjónina, og tøl frá almannaverkinum, benda á, at fleiri útseta at fara á pensjón og arbeiða tískil so at siga fulla tíð.

## Pensjónsaldur

Í 2018 varð nýggj pensjónsskipan sett í gildið. Við henni er samtykt, at pensjónsaldurin hækkar til 67,5 ár á sumri í 2024 og til 68 ár í 2031. Sum nú er, er pensjónsaldurin 67 ár. Samtykta pensjónsnýskipanin merkir, at:

- Pensjónsaldurin framvegis er 67 ár hjá teimum í arbeiðsfjøldini, ið eru født áðrenn 1. juli 1957.
- Frá 1. januar 2025 verður pensjónsaldurin 67,5 ár hjá teimum, ið eru født í tíðarskeiðinum frá 1. juli 1957 til 31. desember 1962.
- Frá 1. januar 2030 verður pensjónsaldurin 68 ár hjá teimum, ið eru født eftir 31. desember 1962.

Ætlanin er, at pensjónsaldurin skal hækka við hálvum ári fimta hvørt ár, so hvørt sum miðallivialdurin hækkar. Tó krevur hetta, at løgtingið samtykkir hesa hækking 10 ár frammanundan at hægri pensjónsaldurin skal gerast galdandi. Tað vil siga, at skal pensjónsaldurin hækka til 68,5 ár í 2035, so skal løgtingið samtykkja tað í 2024.

## Almannaveitingar

Almennar veitingar fevna í høvuðsheitum um tær skipanir, sum tað almenna varðar av, ið tryggjar inntøkugrundarlagið hjá teimum, sum ikki eru á arbeiðsmarknaðinum. Almennu veitingarnar, ið verða mettar sum einstaklingaútreiðslur, hava tað til felags, at tær fella til ávísar borgarar í búfjøldini. Fólk, ið fáa eina almannaveiting, fáa í haldførismyndlinum tillutað veitingarstøðuna 1.

Hendan útgávan av haldførismyndlinum viðgerð einans tær einstaklinga almannaveitingarnar, sum eru mest útreiðslutungar fyri landið og almennu grunnarnar. Hesar eru veitingar til fólkapensjón, fyritíðarpensjón, lestrarstuðul og veitingar frá sosialu grunnunum: ALS, arbeiðsmarknaðar eftirlønargrunninum (AMEG) og barsilsgrunninum. Aðrar almennar einstaklingaveitingingar. Talan er í framrokningini um eina miðal árliga almannaveiting fyri hvørt fólkið í íbúgvaroknskapinum, ið fær hesa veiting. Árliga miðal almanna- og arbeiðsmarknaðarveitingin verður roknað sum: Samlaði kostnaðurin fyri ávísu almannaveitingina í 2018, dividerað við tali av móttakarum av veitingini í 2018. T.d. samlaða útreiðslan til øll sløg av fyritíðarpensjón í 2018, býtt við talið av øllum móttakarum av fyritíðarpensjón í 2018. Almannaveitingar verða í myndlinum javnaðar við prís og produktivitetsvøkstri.

# 1.3 Almennar inntøkur og útreiðslur, einstaklingakostnaður

Í høvuðsheitum koma almennu inntøkurnar frá skattum og avgjøldum. Almenni geirin fær millum annað inntøkur frá inntøkuskatti, MVG, tilfeingisgjøldum, partafelagsskatti, heildarveiting(blokkstuðul) og brúkaragjøldum fyri summar av tænastunum, sum tað almenna veitir. Dátur fyri almennar inntøkur, ið verða nýttar í haldførismyndlinum, koma eitt nú frá input-output talvum frá stuttsýnisbúskaparmyndlinum hjá Búskaparráðnum. Talva 2.1.3 gevur eitt yvirlit yvir almennu inntøkurnar í 2018. Á myndini sæst, at inntøkurnar hjá almenna geiranum í 2018 vóru slakar 10,7 mia. kr. Størstu inntøkurnar stava frá inntøku- og ognarskatti, umframt framleiðslu- og innflutningsskatti.

**Almennar inntøkur 2018, mió. kr.** **Talva 2.1.3**

| *Inntøkur* | Landsfyrisiting og tænasta | Ríkisfyrisiting og tænasta | Kommunufyrisiting og tænasta | Sosialir trygdargrunnar | Almenn fyrisiting og tænasta |
|---|---|---|---|---|---|
| Rentuinntøka, vinningsbýti o.a. | 548 | | 49 | 43 | *640* |
| Framleiðslu- og innflutningsskattur | 2.428 | | | | *2.428* |
| Kravd sosial tryggingargjøld | | | | 1.016 | *1.016* |
| Inntøku- og ognarskattur o.a. | 2.593 | 6 | 2.408 | | *5.007* |
| Aðrar rakstrarflytinga frá øðrum almennum undirgeirum | 59 | | 306 | 38 | |
| Aðrar rakstrarflytinga frá øðrum innlendskum geirum | 145 | 2 | 14 | | *161* |
| Aðrar rakstrarflytinga úr útlondum | 687 | 186 | | | *874* |
| Kapitalskattur og aðrar kapitalinntøkur | 514 | 2 | | | *516* |
| *Tilsamans* | *6.974* | *196* | *2.778* | *1.097* | *10.642* |

Kelda: Hagstova Føroya, LK01010

Almenni geirin í Føroyum fevnir um land, kommunur, sosialar grunnar og ríkisfyrisiting. Í Føroyum er almenni geirin ein lutfalsliga stórur partur av samlaða búskapinum. Framleiðslan hjá almenna geiranum fevnir um tænastuveitingar til ávikavist einstaklingin og til felagsnýtslu (kollektiva nýtslu). Einstaklinga tænastuveitingarnar eru tøkar fyri allar íbúgvar, ið hava ein ávísan tørv. Summar av tænastuveitingum skulu íbúgvarnir ikki gjalda fyri; millum annað tænastur hjá Almannaverkinum ella útbúgving, meðan aðrar hava eitt ávíst brúkaragjald, til dømis barnaansing.

Talva 2.1.4 vísir útreiðslurnar sett upp eftir COFOG-leisti fyri 2018. Tilsamans vóru rakstrarútreiðslurnar 8,3 mia. kr., meðan kapitalútreiðslurnar vóru 2,2 mia. kr.; tað vil siga 10,5 mia. kr. tilsamans. Í COFOG uppgerðini verður almenni geirin býttur í 9 bólkar (almennar samfelagstænastur, lóg og trygd, búskaparviðurskifti, umhvørvisvernd, íbúð og umhvørvi, heilsa, frítíð- mentan og átrúnaður, útbúgving og almannamál).

**Almennar útreiðslur 2018, býtt á COFOG, mió kr.** **Talva 2.1.4**

| COFOG 1 | D Rakstrar útreiðslur | E Kapital útreiðslur | Samlað |
|---|---|---|---|
| 01 Almennar samfelags tænastur | 730 | 65 | 795 |
| 03 Lóg og trygd | 168 | 15 | 183 |
| 04 Búskaparviðurskifti | 942 | 1.136 | 2.078 |
| 05 Umhvørvisvernd | 167 | 29 | 196 |
| 06 Íbúð og umhvørvi | 132 | 125 | 257 |
| 07 Heilsa | 1.263 | 154 | 1.417 |
| 08 Frítíð, mentan og átrúnaður | 369 | 110 | 479 |
| 09 Útbúgving | 1.223 | 469 | 1.692 |
| 10 Almannamál | 3.311 | 71 | 3.382 |
| Samlað | *8.305* | *2.174* | *10.479* |

Kelda: Hagstova Føroya, COFOG

COFOG útreiðslurnar eru fyri allan almenna geiran, tað vil siga, landið, kommunur, sosialu grunnarnar og ríkisfyrisitingina. Almennu rakstrarútreiðslurnar verða í COFOG bólkaðar í fýra undirbólkar. Hesir eru nýtsluútreiðslur, rakstrarflytingar, vinnustudningur og rentu- og annar ognarkostnaður[4]; sí talvu 2.1.5. Í haldførisútrokningini verður ikki tikið hædd fyri rentu- og ognarkostnaði, tí hetta er ikki partur av primeru salduni (primer saldo er samlaðu almennu útreiðslurnar drignar frá samlaðu almennu inntøkunum).

**Almennar útreiðslur, býtt á COFOG, mió. kr.** **Talva 2.1.5**

| COFOG 2 | D1 Rentu- og aðrar ognar útreiðslur | D2 Vinnu studningur | D3 Aðrar raks trarflytingar, | D4 Almenn nýtsluútreiðsla | E1 Kapital útreiðslur | Samlað |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 01 Almennar samfelags tænastur | 79 | 29 | 55 | 566 | 65 | 794 |
| 03 Lóg og trygd | | | 6 | 162 | 15 | 183 |
| 04 Búskaparviðurskifti | 76 | 152 | 77 | 637 | 1.136 | 2.078 |
| 05 Umhvørvisvernd | | 4 | 12 | 151 | 29 | 196 |
| 06 Íbúð og umhvørvi | | | 37 | 94 | 125 | 256 |
| 07 Heilsa | | | 7 | 1.255 | 154 | 1.416 |
| 08 Frítíð, mentan og átrúnaður | | 3 | 84 | 282 | 110 | 479 |
| 09 Útbúgving | | 15 | 137 | 1.071 | 469 | 1.692 |
| 10 Almannamál | | | 1.810 | 1.501 | 71 | 3.382 |
| Samlað | *155* | *203* | *2.225* | *5.719* | *2.174* | *10.476* |

Kelda: Hagstova Føroya, COFOG

**Nýtsluútreiðslur** eru útreiðslur, sum fara til rakstur av tænastum innan almenna geiran. Hesar tænastur eru millum annað heilsuverk og útbúgvingarstovnar. Eru hesar tænastur serliga ætlaðar ávísum aldursbólkum, til dømis skúlagongd ella eldrarøkt, verða útreiðslurnar bólkaðar sum einstaklinganýtsla. Hetta verður gjørt fyri at fanga ávirkanina av demografisku broytingunum í framrokningini. Verða nýtsluútreiðslurnar ikki mettar at vera demografiskt tengdar, innganga tær í myndlinum sum felagsnýtsla.

[4] Til dømis innskot av partapeningi í almenn partafeløg.

Dømi á **rakstrarflytingum** eru millum annað veitingar, her t.d. fólkapensjón, útbúgvingarstuðul og barsilsgjald, umframt flytingar til almennar grunnar. Dømi á **vinnustudningi** eru millum annað stuðul til FAS-skipanina, landbúnaðarstuðul og stuðul til læruplláss.

**Kapitalútreiðslur** eru útreiðslur til íløgur. Stórur partur av kapitalútreiðslunum koma undir COFOG bólkin 04 búskaparviðurskifti. Hesin bólkur fevnir millum annað um alt, ið hevur við undirstøðukervið at gera, her bæði sjóvegis og á landi, umframt byggivirksemi, landbúnað og fiskivinnu. Í myndlinum vera kapitalútreiðslurnar framskrivaðar við prís- og produktivitetsvøkstri. Tó vera útreiðslur til undirsjóvartunlar útfasaðar fram til 2024, tá ið Sandoyartunnilin varð liðugur.

## Rakstrarútreiðslur til almenna felagsnýtslu og einstaklinganýtslu

Almenn nýtsla og flytingar, sum ikki kunnu eyðmerkjast einstaklingum, eru sambært COFOG uppbýtinum: almennar samfelagstænastur, løgregla, búskaparviðurskifti (her millum annað rakstur av undirstøðukervi), umhvørvisvernd, íbúð og umhvørvi. Hesar útreiðslur vaksa í myndlinum við prís- og produktivitetsvøkstri. Vinnustudningur verður eisini mettur at vera ein almenn felagsnýtsla í myndlinum.

Í høvuðsheitinum verða allar flytingar, sum ikki eru at meta sum almennar veitingar, bólkaðar sum felagsútreiðslur. Hetta fevnir um allar flytingar til grunnar og stovnar í almenna geiranum. Hóast flestu almennu veitingarnar kunnu aldurbýtast, eru ávís undantøk, sum merkir, at hesar veitingar ikki verða bólkaðar sum einstaklingaútreiðslur, men heldur sum felagsútreiðslur. Stóru veitingarpostarnir, ið ikki kunnu aldursbýtast, eru rentustuðul og sjúkradagpeningur. Umframt hesar veitingar, verða veitingarsløg við fáum móttakarum, eisini bólkaðar sum felagsútreiðslur. Almenna felagsnýtslan verður mett at fylgja búskapargongdini, tað vil siga at veksa við prís- og produktivitetsvøkstri.

Stórur partur av útreiðslunum hjá almenna geiranum fara til einstaklinganýtslu. Yvirskipað er talan um **nýtslu**, sum er tengd at einum ávísum tørvi (til dømis viðgerð í sambandi við sjúku og heimahjálp) ella aldri (m.a. barnaansing og fólkaskúli). Tað eru serliga børn og ung, umframt teir elstu aldursbólkarnir, sum eru brúkarar av almennum tænastuveitingum. Tey ungu fylla mest í kostnaðinum til barnaansing og útbúgving, meðan tey eldru fylla mest í útreiðslunum til eldrarøkt og heilsuverk. Tað er umráðandi at kunna aldursbýta einstaklingaútreiðslurnar, av tí at demografisku broytingarnar koma at hava stóra ávirkan á hesar.

Bulurin av útreiðslunum innan almennar **flytingar** fara til almennar veitingar sum til dømis pensjón og fyritíðarpensjón, meðan ein minni partur er stuðul til grunnar og stovnar, her millum annað til Granskingargrunnin, Vinnuframagrunnin ella Kirkjugrunnin. Almennar veitingar fevna í høvuðsheitum um tær skipanir, sum tað almenna varðar av, ið tryggjar inntøkugrundarlagið hjá teimum, sum ikki eru á arbeiðsmarknaðinum, men eisini aðrar almennar veitingar sum til dømis heilsutrygd og rentustuðul. Eins og við almennu nýtsluútreiðslunum, er skilnaður millum felags almennar útreiðslur og einstaklingaútreiðslur.

Einstaklingakostnaður verður framroknaður við tí forteyt, at miðal aldursbýtti kostnaðurin eru støðugur í øllum framrokningartíðarskeiðinum. Tó fellur miðal aldursbýtti kostnaðurin til heilsu og ellisrøkt væntandi við tíðini vegna heilsugóða elli. Einstaklingakostnaður er at finna í fylgjandi COFOG bólkum: *07. Heilsa 08. Frítíð, mentan og átrúnaður 09. Undirvísing 10. Almannamál*, sí talvu 2.1.6.

**Einstaklinga kostnaður** **Talva 2.1.6**

| Høvuðsfunktión | Undirfunktión | Aldursprofilur | Framskrivingarháttur | Kelda |
|---|---|---|---|---|
| 07. Heilsa | Sjúkrahúsverkið, heilsutrygd | Danskur | Demografi/aldur + heilsugóð elli | COFOG 2018, IB01031, DREAM |
| 08. Frítíð og mentan | Frítíð, mentan, religión v.m. | Føroyskur | Demografi/javnt | COFOG 2018, IB01031 |
| 09. Útbúgving | Fólkaskúli | Føroyskur | Demografi/aldur | COFOG 2018, IB01031, Undirvísingarstýrið |
| | Ungdómsútbúgvingar v.m. | Føroyskur | Demografi/aldur | COFOG 2018, IB01031, leiðslukunningarskipanin, Studni |
| | Hægri lestur | Føroyskur | Demografi/aldur | COFOG 2018, IB01031, leiðslukunningarskipanin, Studni |
| 10. Almannamál | Familja og børn | Føroyskur | Demografi/aldur/javnt | COFOG 2018, IB01031, UV01010 |
| | Røktarheim | Føroyskur | Demografi/aldur + heilsugóð elli | COFOG 2018, IB01031, Landsfólkayvirlitið |
| | Heimahjálp | Føroyskur | Demografi/aldur + heilsugóð elli | COFOG 2018, IB01031, Tórshavnar Kommuna, Roðin og Norðuroyar bú- og heimatænasta |
| | Trivnaðartænastur og Almannaverkið annars | Føroyskur | demografi/javnt (7-70 ár) | COFOG 2018, IB01031, Almannaverkið |

## Einstaklingakostnaður til Heilsu

Vegna manglandi hagtøl[5] er trupult at aldursáseta heilsukostnaðin við føroyskum dátum. Tískil eru danskar aldursbýttar dátur frá DREAM nýttar. Tað verður hervið sett sum treyt í myndlinum, at mynstrið fyri hvørji, ið nýta heilsuverkið, líkist í Føroyum og Danmark. Aldursbýtti kostnaðurin fyri heilsu hjá DREAM, byggir á aldursbýttar dátur frá danska Finansministeriet, ið síðani er viðgjørt við ymiskum útjavningarháttum, umframt modellering av heilsugóðari elli.[6]

[5] Landssjúkrahúsið hevur latið dátur um, hvussu nógv 0-100+ ára gomul á onkran hátt hava móttikið tænastu frá sjúkrahúsinum (kontakt-dátur). Rákið er, at tað eru teir eldru aldursbólkarnir, sum hava mest kontakt við heilsuverkið. Eisini sæst, at nýføðingar (ið flest allir verða føddir á sjúkrahúsinum) og kvinnur í burðardyggum aldri, hava eitt økt samband við sjúkrahúsverkið. Hóast hesar dátur kunnu geva eina ábending um hvørjir aldursbólkar hava okkurt slag av samband við heilsuverkið, so siga tær onki um kostnaðin.

[6] Dáturnar eru útjavnaðar og rættaðar soleiðis at DREAM fær makroútreiðslurnar fyri støðisárið 2014. Harumframt er talan um eitt vigað miðal yvir kyn og uppruna. Finansministeriet tekur støði í *Landspatientregistret* (ið hevur upplýsingar um takstin á ambulantum og støðufestum viðgerðum), tá almennu útreiðslurnar fyri sjúkrahúsnýtslu skulu býtast á einstaklingar. Almennar útreiðslur til stuðul til heilivág verða býttar á einstaklingar við støði í *Lægemiddeldatabasen* (sum hevur upplýsingar um stuðul til heilivág fyri allar danir gjøgnum árið). Útreiðslur til donsku heilsutrygdina verða býttar á einstaklingar við støði í skráum við upplýsingum fyri nýtslu av kommunulækna, serlækna, tannlækna og øðrum heilsutrygdartænastum.

**Aldurbýttar nýtsluútreiðslur til heilsu** **Mynd 2.1.6**




Kelda: Landsbanki Føroya

Mynd 2.1.6 vísir einstaklingkostnaðin fyri heilsu. Danskur einstaklingakostnaður fyri heilsu í 2014 er rættaður til føroysku heilsuútreiðslurnar (COFOG 07. Heilsa) í støðisárinum 2018[7]. Myndin vísir týðiliga, at tað serliga eru teir eldru aldursbólkarnir, ið eru teir mest útreiðslutungu. Frá áleið 60 ára aldri økist miðal einstaklinga heilsukostnaðurin støðugt fram til áleið 80 ára aldur, har vøksturin avtekur. Miðal útreiðslan fyri tey 80 til 100+ ára gomlu liggur millum 66.000 kr. og 78.000 kr. Sostatt kann væntast, at broytingin í fólkasamansetingini við vaksandi eldrabrøki og hægri miðallivialdri, kemur at leggja trýst á heilsuútreiðslurnar.

## Einstaklingakostnaður á útbúgving

Nýtsluútreiðslurnar til útbúgvingarøkið, eru í høvðusheitum aldursbýttar við tølum frá Útbúgvingarstýrinum, Studna og Gjaldstovuni. Mynd 2.1.7 vísir, at einstaklingakosturnaðurin til útbúgving er hægst fyri fólkaskúlanæmingar. Hetta er natúrligt, av tí at tað er kravt, at øll børn skulu ganga í fólkaskúla.

Einstaklingakostnaðurin fyri 16-19 ára gomul er somuleiðis høgur, tá ið størsti parturin av teimum ungu í dag taka eina miðnáms- ella yrkisútbúgving. Einstaklingakostnaðurin til hægri lestur ber brá av, at nógv velja at lesa uttanlands, og av tí sama er ein stórur partur av útreiðslunum til hægri lestur ikki partur av føroysku útreiðslunum til útbúgving.

[7] Vegna manglandi dátur um føroysku einstaklinga útreiðslurnar til heilsu, verður heilsuútreiðslan við donskum einstaklinga útreiðslum roknað í mun til føroysku búfjøldina. Síðani verður lutfallið millum framroknaðu útreiðslurnar og veruligu útreiðslurnar frá COFOG funnið. Hetta lutfall, eisini kallað kalibreringsfaktorur, verður síðani faldað við donsku einstaklinga útreiðslurnar til tess at finna føroysku einstaklinga útreiðslurnar.

**Aldurbýttar nýtsluútreiðslur til útbúgving** **Mynd 2.1.7**




Kelda: Landsbanki Føroya

## Einstaklingakostnaður til almannamál

Nýtsluútreiðslurnar til almannamál fevna í høvðusheitum um útreiðslur til barnaansing, trivnaðartænastur og eldrarøkt. Trivnaðartænastur eru tær tænastur, ið Almannaverkið umsitur. Trivnaðartænastur eru ætlaðar borgarum við serligum tørvi. Hesar tænastur fevna m.a. um vardan bústað, persónligan stuðul, vard verkstøð og umlætting. Eldrarøkt fevnir í høvuðsheitinum um heimatænastur (heimasjúkrarøkt og heimahjálp) og røktar- og ellisheim.[8]

**Aldurbýttar nýtsluútreiðslur til almannamál** **Mynd 2.1.8**




Kelda: Landsbanki Føroya

[8] Ein minni partur av útreiðslunum í eldrarøkt fer til dagtilboð og umlætting, men vegna manglandi dátur, verður hesin kostnaðurin býttur javnt út á allar pensjónistar.

Mynd 2.1.8 vísir einstaklingakostnaðin fyri almennar umsorganartænastur. Myndin vísir, at einstaklinga útreiðslurnar til almannamál eru lutfalsliga høgar fyri børn upp til 8 ára aldur. Tað eru serliga útreiðslurnar til barnaansing og frítíðarskúla, sum fylla. Hereftir fellur einstaklingakostnaðurin til almennar umsorganartænastur munandi og er støðugur fram til áleið 65 ára aldur, tá ið einstaklingakostnaðurin til ellisrøkt byrjar at hækka. Einstaklingakostnaðurin fyri ellisrøkt, ið fevnir um útreiðslur til ellis- og røktarheim, heimahjálp og ellisrøkt annars, byrjar at vaksa munandi við 78 ára aldur. Hesin vøkstur verður enn brattari, tá fólk gerast 95+ ára gomul, og er miðal einstaklingakostnaður fyri ein 95+ ára gamlan áleið 600.000 kr. Hetta vísir, at meginparturin av teimum, sum eru 95+ búgva á røktar- og ellisheimi, ella fáa nógva heimahjálp.

Útreiðslurnar til dagstovna- og frítíðarskúlaøkið eru aldursbýttar við hagtølum frá Hagstovu Føroya, ið áseta, hvussu stórur partur av teimum 0-10 ára gomlu vóru á stovni í miðal frá 2015-2021. Útreiðslur til trivnaðartænastur hjá Almannaverkinum eru býttar javnt millum 7-70 ára gomul.

Útreiðslurnar til ellis- og røktarheim eru aldursbýtt við dátum frá Landsfólkayvirlitinum, ið eyðmerkja borgarar, ið búgva á ellis- og røktarheimum. Útreiðslur til heimarøkt eru aldursbýttar við dátum frá Tórshavnar kommunu, Roðanum og Norðoya bú- og heimatænastu fyri veittir minuttir av heimahjálp. Útreiðslur til almannamál annars eru hinvegin býtt javnt millum øll.

## Einstaklinga kostnaður fyri Frítíð og mentan

Frítíð, mentan og átrúnaður verður mett at fylgja demografisku broytingunum, heldur enn at vaksa við produktivitetsvøkstri. Hetta kemur av, at almennu tænasturnar innan hetta økið eru treytaðar av støddini á búfjøldini, og at tilboðini verða bjóðaði eftir tørvi. Hetta ger seg millum annað galdandi við talinum av spæliplássum ella kirkjum, ið verða bygdar. Tískil kann væntast, at úrvalið av tilboðum somuleiðis er vaksandi við búfjøldini. Hetta talar sostatt fyri, at nýtslan til frítíð, mentan og átrúnað verður einstaklingabýtt, heldur enn at vera mett sum felagsútreiðsla.

Hóast rakstrarkostnaðurin fyri frítíð, mentan og átrúnað verður mett at skula býtast út á einstaklingin, er ikki grundarlag fyri at áseta aldursávirkan í útreiðslubýtinum. Hetta kemur av, at tað er nærum ógjørligt at oyramerkja móttakaran av frítíðar-, mentanar- og átrúnaðartilboðum, sum tað almenna varðar av. Tískil verður rakstrarkostnaðurin mettur at vera eins fyri øll, og útreiðslurnar verða tískil býttar javnt á alla búfjøldina.

## Heilsugóð elli

Síðani 1985/1986 er miðal restlivitíðin hjá 67 ára gomlum vaksin við 4,8 árum fyri menn og 3,5 árum fyri kvinnur. Tað er í hesum samanhangi áhugavert at kanna ávirkanina av longdari miðallivitíð. Merkir ein øking í miðallivitíð fleiri ár við vánaligari heilsu, ella er tað heldur heilsubetringin hjá teimum eldru, ið førir til øktan miðallivialdur? Í hesum sambandi er neyðugt at taka støðu til, hvussu heilsu- og eldraútreiðslur verða framskrivaðar, tað vil siga, hvørt aldursbýtti einstaklingakostnaðurin í 2018 skal framskrivast við broyttu fólkasamansetingini, har heilsan hjá teimum eldru ikki væntast at gerast betri í framskrivingartíðarskeiðinum, ella um tað ístaðin er mett at vera ein samanhangur millum betri heilsu og hægri miðallivialdur.

DREAM nýtir dáta fyri terminalkostnaðir í síni útrokning av danska fíggjarpolitiska haldførinum. Terminalkostnaður er kostnaður knýttur at viðgerð av sjúku upp til seinastu 3 liviárini. Við heilsugóðari elli verða einstaklinga heilsuútreiðslurnar mettar sum terminalútreiðslur, ið merkir, at aldursásettu útreiðslurnar taka útgangsstøði í restlivitíð heldur enn sonnum aldri.[9] Ein øking av restlivitíðini merkir, at tað eru færri í einum ávísum aldursbólki, sum eru í terminalu fasuni. Tískil vilja heilsuútreiðslurnar til ein ávísan aldursbólk veksa lutfalsliga spakuligari, enn fólkatalið (Hansen. J. Z. et al, 2023). Tað finnast tó ikki føroyskar dátur fyri terminalkostnaðir, og tískil er framferðarhátturin í hesi frágreiðing eitt sindur øðrvísi, men verður mettur at hava somu ávirkan sum framferðarhátturin hjá DREAM.

Í føroysku framrokningini verða útreiðslurnar til heilsu- og ellisrøkt tillagaðar fyri øktari restlivitíð. Dátur um væntaða restlivitíð fyri allar aldursbólkar í øllum framskrivingartíðarskeiðinum frá norsku hagstovuni (Statistisk Sentralbyrå) eru nýttar at rokna aldurstreytaðu broytingina í restlivitíðini.[10] Einstaklinga kostnaðurin fyri heilsu og ellisrøkt verður hereftir tillaga fyri broyting í restlivitíð hjá øllum aldursbólkum omanfyri 50 ár yvir alt framskrivingartíðarskeiðið. Sostatt merkir ein øking í miðallivialdrinum, at aldurstreytaðu heilsukostnaðirnir lutvíst lækka.[11]

**Aldur á kostnaðarprofili við heilsugóðari elli   Talva 2.1.7**

| Faktiskur aldur | 2020 | 2040 | 2060 |
|---|---|---|---|
| 50 ár | 50 ár | 47 ár | 44 ár |
| 60 ár | 60 ár | 57 ár | 55 ár |
| 70 ár | 70 ár | 67 ár | 65 ár |
| 80 ár | 80 ár | 78 ár | 77 ár |
| 90 ár | 90 ár | 89 ár | 89 ár |
| 95 ár | 95 ár | 95 ár | 94 ár |

Talva 2.1.7 vísir nøkur dømi á, hvussu útreiðsluprofilurin hjá ymiskum aldursbólkum broytist í framrokningartíðarskeiðinum, tá ið rættað er fyri restlivitíð. Talvan vísir til dømis, at ein 50 ára gamal í 2060 hevur útreiðsluprofilin hjá einum 44 ára gomlum, og at ein 80 ára gamal í 2060 hevur útreiðsluprofilin hjá einum 77 ára gomlum. Leggjast skal til merkis, at árliga broytingin í restlivitíð fyri elstu aldursbólkarnar er somikið lítil, at nærum eingin broyting er í útreiðsluprofilinum frá 2020 til 2060; hetta tí tað er ósannlíkt, at elstu aldursbólkarnar kunnu gerast munandi minni útreiðslutungir, hóast tey væntast at liva eitt sindur longri. Hetta sæst serliga fyri 90+ ára gomul. Fyri at til dømis 49 ára gomul fólk í 2060 ikki skulu gerast útreiðslutyngri, enn 50 ára gomul í 2060, eru útreiðslurnar til heilsu og ellisrøkt eisini rættaðar fyri restlivitíð hjá 44-49 ára gomlum.

Myndirnar 2.1.9a og b vísa, hvussu einstaklingakostnaðurin fyri heilsu og ellisrøkt broytist, tá atlit verður tikið til heilsugóðari elli. Heilsugóð elli førir við sær, at strikumyndin førkar seg til høgru. Á myndunum sæst, at avleiðingin av heilsugóðari elli sæst fyrr á einstaklingakostnaðinum fyri heilsu, enn fyri

[9] Arnberg S., Bjørner T.B., Nationaløkonomisk Tidsskrift Vol. 148 (2010) s. 43
[10] Føroyska aldursframrokningin tekur støði í tí hjá norsku SSB, tí mett verður, at søguliga gongdin í Føroyum í ein stóran mun samsvarar norska fólkatalinum.
[11] Hesin framferðarháttur verður eisini nýttur í Grønlendsku haldførisfrágreiðingini (Hansen og Stephensen, 2021b).

eldrarøkt. Hetta kemur av, at tað eru næstan ongar einstaklinga útreiðslur knýttar at eldrarøkt, fyrr enn um 70 ára aldur. Eins og í talvu 2.1.7 sæst á mynd 2.1.9a, at útreiðsluprofilurin hjá elstu aldursbólkunum broytist sera lítið, ið hevur við sær, at einstaklingakostnaðurin fyri heilsu ikki broytist stórvegis fyri elstu aldursbólkarnar. Grundin til at eitt lop sæst fyri 95+ ára gomul í strikumyndini 2.1.9b, er at vegna fáar eygberingar, er stórur munur á einstaklinga kostnaðinum hjá 94 ára gomlu og 95+ ára gomlum. Tí fella einstaklinga útreiðslurnar relativt nógv, tá ið 95+ ára gomul í 2060 fáa útreiðsluprofilin hjá 94 ára gomlum.

**Einstaklinga útreiðslur til heilsu   Mynd 2.1.9a**

*Heilsugóð elli*




**Einstaklinga útreiðslur til aldurdóm  Mynd 2.1.9b**

*Heilsugóð elli*




Kelda: Landsbanki Føroya

## 1.3.1 Tjóðarroknskapur

Ein kann hyggja at tjóðarroknskapinum sum eitt flokkingarkervi (klassifikationssystem), ið ger tað møguligt at fáa yvirlit á einum ógviliga stórum tali av búskaparligum transaktiónum í samfelagsbúskapinum í einum ávísum tíðarskeiði. Hugtøk sum eitt nú bruttotjóðarúrtøka, privat nýtsla og óbeinleiðis skattir eru úrleidd frá tjóðarroknskapinum. Tjóðarroknskapurin lýsir, hvussu inntøkur koma frá virkseminum í landinum, sum síðan verður deilt og býtt sundur av nýggjum, fyri síðani av vera grundarlagið fyri eftirspurninginum av vørum og tænastum, bæði til nýtslu og íløgur. Soleiðis er alt í ringrás. Ringrásin verður lýst innanfyri rammurnar av eini kontoskipan, ið er grundarsteinurin handan tjóðarroknskapinum. Ymisk tjóðarroknskapartøl vera nýtt sum input í makrobúskaparliga myndlinum (sí brot 2.2) í hesari haldførisgreiningini, eitt nú søguligt BTÚ, almennar inntøkur og útreiðslur, umframt virksemisbygnaðurin í samfelagnum.

Input-output (IO) talvur, sum stava frá myndlinum við stuttum sýni hjá Búskaparráðnum (konjunkturfrágreiðingar), innganga í haldførismyndlinum. Við IO-talvunum fæst ein nágreinilig lýsing av virksemisbygnaðinum í samfelagnum, umframt nýtsluni av vørum og tænastum. IO-talvurnar vísa allar samvirkanir millum geirar í samfelagnum; millum annað almenna geiran, húsarhald og fyritøkur, og eru tí sera upplýsandi. Í IO-talvunum sæst nýtsla og veitan av tilfari í privata vinnugeiranum,

útflýggjan til privata og almenna nýtslu umframt nettovøruskattur fyri hvønn einstakan vinnugeira. Íløgur frá einstøku vinnugeirunum eru eisini frá tjóðarroknskapinum.

Ein fyrimunur við at nýta IO-talvur í haldførismyndlinum er, at tað millum annað sæst beinleiðis, hvørjar vinnugreinar eru serliga bundnar at útflutninginum. Eitt nú endar mesti parturin av framleiðsluni hjá 'fiskavirking' sum útflutningur, meðan aðrar vinnugreinar stórt sæð einki útflyta.

Almennu inntøkurnar og útreiðslurnar eru rættiliga væl nágreinaðar í myndlinum. Inntøkurnar stava millum annað frá inntøkuskatti, ymiskum avgjøldum og heildarveiting úr Danmark. Tær flestu inntøkurnar veksa við inflatión og produktivitetsvøkstri í framrokningini. Tó er inntøkuskatturin eisini treytaður av reallønini og støddini á arbeiðsfjøldini og blokkstuðulin er fastfrystur. Almennu útreiðslurnar stava serliga frá útreiðslum til almennar tænastur, ymiskar veitingar og rentum á skuld. Fleiri útreiðslur veksa í framrokningini við inflatión og produktivitetsvøkstri, meðan aðrar harumframt vaksa við demografi, sí brot 2.1.2.

# 1.4 Makrobúskaparligur myndil

Makrobúskaparligi myndilin, ið verður nýttur sum útgangsstøði til útrokning av føroyska haldførisávísanum, er sum nevnt bygdur á ein myndil, sum danski granskingarstovnurin DREAM hevur ment fyri grønlendska búskaparráðið. Í hesum skjalinum gera vit eina yvirskipaða lýsing av makrobúskaparliga myndlinum og hvør luturin hjá hesum er í myndlaskipanini, sí síðu 6. Ein meira nágreinilig lýsing av makrobúskaparliga myndlinum er at finna í Hansen (2021), Hansen og Stephensen (2021a) og Hansen og Stephensen (2021b).

**Samvirknaðarmynstur í myndlinum** **Mynd 2.2.1**




Makrobúskaparligi myndilin er ein sonevndur CGE[12] strukturmyndil fyri samlaða búskapin við serligum atliti at langsýntar haldførisgreiningar. Myndilin er ikki ein forsagnarmyndil og kann eitt nú ikki brúkast til forsagnir um konjunktursveiggj í búskapinum. Eitt eyðkenni við myndlinum er, at hann lýsir allar

[12] Computable General Equilibrium

geirar og marknaðir í búskapinum og samvirknaðin millum hesar innanfyri ein samanhangandi ástøðiligan karm. Mynd 2.2.1 er ein skitsa av samvirknaðarmynstrinum í myndlinum.

Niðanfyri er ein skitsa av, hvussu myndilin verður nýttur (mynd 2.2.2). Út frá líkningsskipanini fyri búskapin, dátum frá formyndlunum og øðrum eksogenum parametrum, verður myndilin kalibreraður til eitt støðisár. Síðani verður grundframlitið funnið við at framrokna gongdina í búskapinum út frá støðisárinum. Eitt alternativt framlit verður funnið við at geva ein stoyt til grundframlitið, tað vil siga, gera eina broyting av útvaldum fortreytum og annars halda alt annað líka í mun til grundframlitið. Avleiðingin av tiltøkum t.d. einari hækking av pensjónsaldri, verður síðani funnin við at samanbera haldførisávísarnar í grund- og alternativu framlitunum.

**Nýtsla av myndli** **Mynd 2.2.2**




## CES-framleiðslufunktión

Framleiðslubygnaðurin er lýstur við einari samansettari CES-funktión (Constant Elasticity of Substitution).[13] Endamálið við hesi CES-funktiónini er at lýsa ávirkanina millum teir faktorar, ið hvør á sín hátt ávirka framleiðsluna í samfelagnum. Í hesum føri fevna framleiðslufaktorarnir um kapital, arbeiðsmegi og tilfarsnýtslu. Myndin niðanfyri vísir samansettu CES-funktiónina, ið verður nýtt í myndlinum.

Á mynd 2.2.3 sæst, at framleiðslan í hvørjum einstakum vinnuídnaði, er samansett á fylgjandi hátt:

1) Framleiðslan krevur í høvuðsheitinum íkast frá bæði kapitali og tilfari.
2) Kapitalkervið krevur íkast frá arbeiðsmegi og kapitaltólinum (fastur partur av framleiðsluni).
3) Tilfar er uppgjørt av innfluttum og innlendskum tilfari, ið inngongur í innlendskari framleiðslu, umframt framleitt tilfar, ið verður útflutt.

Nýtsla og veitan av tilfari í privata vinnugeiranum, umframt útflýggjan til privata og almenna nýtslu, eru at finna í Input-Output talvunum. Herfrá fæst eisini nettovøruskattur fyri hvønn einstakan vinnuídnað. Íløgur frá einstøku vinnugeirunum eru frá tjóðarroknskapinum. Dátur fyri arbeiðsmegi eru frá íbúgvaroknskapinum.

[13] Neyvari lýsing er at finna í Hansen og Stephensen (2021a).

**Samansett CES-funktión** **Mynd 2.2.3**




## Fyritøkur

Hóast føroyski tjóðarroknskapurin verður býttur í 19 vinnugreinar, verður talið av vinnugreinum lækkað til 10 við at leggja smáar vinnugreinar saman. Fyritøkurnar eru býttar í 10 vinnugreinar; 9 privatar og eina almenna. Hvør einstøk vinnugrein framleiðir vørur við nýtslu av tilfari, kapitali og arbeiðsorku. Framleiðslubygnaðurin er skipaður eftir CES-funktiónini. Tær 10 vinnugreinarnar eru: Fiskaídnaður, Fiskaaling, Fiskavirking, Annar ídnaður, Byggivinna, Tænastuvinna (handil, umvæling, gistingarhús og matstovur), Farmaflutningur, Fastogn, útleigan og handilsligar tænastur v.m., Aðrar tænastur og Almenn umsiting, vernd og umsorganartænastur.[14]

Vørur, sum eru framleiddar innlendis, verða útfluttar til útheimin treytað av eftirspurningi frá útlondunum. Eftirspurningurin frá útlondunum fellur um býtislutfallið versnar, eitt nú av einum stórum vøkstri í framleiðslufaktorunum (t.d. í innlendska lønarstøðinum).

## Húsarhald

Húsarhaldini innganga í framleiðslufunktiónina á tann hátt, at tey bjóða út arbeiðsorku, og eru sostatt ein partur av framleiðsluni. Húsarhaldini gjalda skatt og avgjøld, og nøkur fáa samstundis almannaveitingar. Inntøkan hjá húsarhaldinum kemur frá arbeiðsinntøku, almannaveiting og kapitalavkasti frá privata geiranum. Skatturin verður í myndlinum settur til at vera líka fyri øll inntøkusløg hjá húsarhaldunum.

Realur búskaparvøkstur inngongur við tí fortreyt at tøknilig framstig, ið spara arbeiðsmegi, eru eins innan allar vinnugreinar.

Nýtslan hjá húsarhaldunum verður lýst við eini nýtslufunktión, ið líkist henni sum Danmarks Statistik nýtir í myndlinum ADAM[15]. Nýtslan er treytað av samlaðu inntøkunum og ognarvirðinum hjá húsarhaldunum.

---

[14] Tjóðarroknskapurin fevnir um 19 vinnugreinar, men fleiri av hesum eru lutfalsliga smáar, og tískil verða hesar avmarkaðir til 10 vinnugreinar.

[15] Danmarks Statistik (2012).

Nýtslan verður býtt á innlendis nýtslu og innfluttar vørur. Innlendis nýtslan verður harumframt býtt á 10 vørusløg, ið umboða tær 10 vinnugreinarnar. Á nýtsluvørunum eru avgjøld sum tollur og produktskattir.

## Almenni geirin

Almenni geirin verður ikki lýstur við eini framleiðslufunktión, men út frá lutum úr tjóðarroknskapinum og samvirkan millum framleiðslufaktorar. Fortreytin um nýtslu av arbeiðsorku og tilfari tekur støði í, at virðið av vørukeypi, ið er ein fastur partur av nettoframleiðsluøkingini, er samsvarandi greiningum frá Grønlandi og Danmark.

Almenni geirin framleiðir vørur og nýtir tilfar til sína framleiðslu, eins og aðrir geirar gera. Meginparturin av tilfarsnýtsluni hjá almenna geiranum, stavar frá egnari framleiðslu.

Primer saldo er tær samlaðu almennu útreiðslurnar drignar frá samlaðu almennu inntøkunum. Inntøkurnar eru millum annað framleiðsluskattir, vøruskattir, toll, lønarskattir, og stava í myndlinum frá input-output talvunum. Útreiðslurnar eru eitt nú almenn nýtsla, veitingar til húsarhald og prísurin á almennum íløgum. Gongdin í almennu ognini er treytað av primeru saldoini. Ein negativ primer saldo fer við tíðini eta burturav nettoognini.

## Parametrar

Teir flestu eksogenu parametrarnir, sum verða nýttir í haldførisgreiningini, stava frá Hansen og Stephensen (2021b). Eitt yvirlit yvir parametrar sæst í talvu 2.2.1.

Eindirnar  í myndlinum eru vakstrar- og inflatiónskorrigeraðar.[16] Metingin fyri inflatión og nominella rentu er frá seinastu langsýntu framrokningini av búskapinum hjá DREAM Hansen et al. (2023).

Diskonteringsratan til at útrokna nútíðarvirðið av BTÚ og primeru yvirskotunum er normerað til 1 í støðisárinum og verður eftirfylgjandi: $r_t^{disk} = r_{t-1}^{disk} * \frac{(1+g)(1+\pi_t)}{1+i_t}$.
Nútíðarvirðið verður nýtt til at útrokna haldførisávísan.

[16] Av tekniskum áðum er tað lættari, at loysa líkningsskipanina um variablarnir eru niðurskaleraður numerisk (Hansen 2021).

**Parameturvirðir í búskaparmyndlinum** **Talva 2.2.1**

| Parametrar | GAMS navn | Virði | Frágreiðing |
|---|---|---|---|
| $g$ | grow.l(t) | 0,0125 | Realbúskaparlig vakstrarrata |
| $i_t$ | fi.l(t) | 0,04 | Nominel renta |
| $r_t^{virk}$ | fivirk.l(t) | 0,075 | Nominelt avkastkrav hjá fyritøkunum |
| $\pi_t$ | fp.l(t) | 0,018 | Útlendsk inflatiónsrata |
| $\tau_t^W, \tau_t^{TR}, \tau_t^r$ | t w.l(t), t tr.l(t), t r.l(t) | 0,33 | Inntøkuskattir á løn, almannaveitingum og kapitalavkasti |
| $E_j^Y$ | EY.l(j) | 0,67 | Elastisitetur millum tilfar og KL-aggregat (fra DREAM model) |
| $E_j^H$ | EH.l(j) | 0,1 | Elastisitetur millum kapital og arbeiðskraft |
| $E_j^M$ | EM.l(j) | 1,25 | Elastisitetur millum innlenskt og útlendsk tilfar (frá DREAM myndlinum) |
| $E_j^{ZM}$ | EZM.l(j) | 0,25 | Elastisitetur millum tilfarsinput frá ymisku innlendsku vinnunum |
| $E^I$ | EM.l | 1,25 | Innflutningselastisitetur í íløguvørum (frá DREAM myndlinum) |
| $E^{ZI}$ | EZI.l | 0,99 | Elastisitetur millum ymisk innlendsk íløguinput |
| $E^C$ | EC.l | 1,25 | Elastisitetur millum innlendskt og útlendskt input í privatu nýtsluni (Frá DREAM myndlinum) |
| $E^{ZC}$ | EZC.l | 0,95 | Elastisitetur millum innlendskar vørur í privatu nýtsluni |
| $E^G$ | EG.l | 1,25 | Elastisitetur millum innlendskt og útlendskt input í almennu nýtsluni (Frá DREAM myndlinum) |
| $E^{ZG}$ | EZG.l | 0,25 | Elastisitetur millum innlendskar vørur í almennu nýtsluni |
| $S_j$ | S.l(j) | 1 | Elastisitetur millum usercost prísi á kapitali millum vinnur |
| $E^x$ | Ex.l | 5 | Útflutningselastisitetur |

Kelda: DREAM

## Kalibrering

Makrobúskaparligi myndilin verður kalibrereraður til úrslitini frá formyndlunum, serliga til input output myndilin. Kalibreringin verður gjørd eftir sama leisti, sum greitt verður frá í teknisku vegleiðingini fyri Grønlendska myndilin, sí (Hansen 2021).

Myndilin verður kalibreraður soleiðis, at samsvar er við tjóðarroknskapin og almenna fíggjarstandin (úrslitið hjá almenna geiranum) í støðisárinum. Høvuðsdatakeldan til hetta eru input-output talvurnar frá tjóðarroknskapinum. Tað eru ikki hagtøl fyri fleiri av parametrunum, eitt nú atburðarparametrunum. Hesir verða funnir við kalibreringini, soleiðis at teir loysa líkningssystemið í støðisárinum. Meginparturin av endogenu variablunum verða kalibreraðir.

Endamálið við kalibreringini er at stilla myndilin, soleiðis at hann umboðar langtíðar eginleikarnar í búskapinum. Innan CGE-myndlan er vanligt at stilla myndilin til strukturel virðir í støðisárinum fyri at sleppa undan ávirkan frá stutttíðarsveiggjum. Enn eru ikki input-output talvur á strukturellum stigi í Føroyum. Tí verður, í hesi útgávuni, tað nýggjasta og mest konjunturneutrala árið valt sum støðisár, sum er 2018. Tjóðarroknskapurin er uppgjørdur fram til 2022. Nýggjastu árini hava verið sermerkt og

víkja nógv frá tí vanliga; árini frá 2020 fram til 2022 hava verið merkt av Covid-19, eftirvirkningum av Covid-19, geopolitiskum ófriði, hækkandi rentum og høgari inflatión, ið merkir, at tey eru ikki væl egnaði sum støðisár. Í 2019 var vøksturin í BTÚ sera høgur, ein av stóru grundunum var ein økt tøkunøgd av laksi. Valið er fallið á 2018, millum annað tí at vøksturin í BTÚ í 2018 var lægri, enn árini rundanum; hesin lægri vøksturin stavaði serliga frá verri býtislutfalli í uttanlandshandlinum. Innflutingsvirðið í 2018 hækkaði í mun til árið fyri, serliga orsaka av hækking í oljuprísum og útflutningsvirðið minkaði, tí minni nøgdir av uppsjóvarfiski og alifiski vóru útflutt í mun til árið fyri.

Myndilin roknar fram til 2100, men av tí at fólkatalsframrokningin hjá Hagstovu Føroya einans gongur til 2062, verður íbúgvaroknskapurin settur støðugur frá 2062 og fram til 2100.

### Broytingar í mun til støðisár

Í myndlinum er nýtt sum fortreyt at fíggjarpolitikkurin í framrokningini er óbroyttur í mun til støðisárið (neutralur fíggjarpolitikkur). Yvirskipað merkir tað, at vælferðarstøðið er óbroytt í allari framtíð. Tað eru tó atlit tikin til ávísar broytingar og fíggjarpolitisk átøk, ið eru samtykt eftir støðisárið 2018 og fram til 2023. Til dømis kann nevnast, at pensjónsaldurin hækkar í 2025 og 2030, og ein øking í fólkapensjónini á 6.960 kr. um árið er íroknað við at hækka veitingina fyri fólkapensjón í myndlinum, og harafturat er skattafrádrátturin á 6.000 kr. árliga til pensjónistar, ið hevði fullan virknað í 2021, tikin við.[17]

Tænastatumannaeftirlønirnar verða viðgjørdar uttanfyri myndilin, og inngoanga eksogent í framrokningini. Nútíðarvirðið á framtíðar skyldunum til tænastumenn í 2022 var áleið 4 mia. kr. sambært Gjaldstovu Føroya. Útgjøldini til tænastumenn vaksa fram til áleið ár 2040, og minka hereftir.

Kapitalútreiðslurnar til Eysturoyar- og Sandoyartunlarnar, verða viðgjørdar serskilt, og fella burtur, tá ið tunlarnir eru liðugt bygdir. Kapitalútreiðslurnar til undirsjóvartunlar inngangа sum ein eksogen tíðarseria.

## 1.5 Haldførisávísi

Fíggjarpolitiskt haldføri verður lýst við talinum, ið kallast haldførisávísin. Haldførisávísin vísir, um væntaðu framtíðar almennu inntøkurnar fara at røkka til at fíggja komandi almennu útreiðslurnar. Haldførisávísin vísir, hvussu stórur prosentpartur av BTÚ í krónum og oyrum manglar í á hvørjum ári, um verandi tænastustøði skal kunna veitast í framtíðini.

Haldførisávísin verður lýstir sum:

$$\text{Haldførisávísi} = \frac{\sum_{t=0}^{\infty} B_t (\frac{1}{1+r})^t - D_0}{\sum_{t=0}^{\infty} BTÚ_t (\frac{1}{1+r})^t}$$

[17] Í 2019 samtykti Føroya Løgting ein skattafrádrátt til pensjónistar. Skattafrádrátturin var í tveimum, í 2020 var frádrátturin 3.000 kr. fyri hvønn pensjónist og í 2021 er hann hækkaður upp í 6.000 kr. fyri hvønn pensjónist. Skattafrádrátturin til fólkapensjónina verður í myndlinum roknaður sum ein negativ inntøka. Umframt skattafrádráttin á 6.000 kr. fyri hvønn pensjónist, er grundupphæddin í 2021 hækkað við 6.960 kr. fyri hvønn pensjónist um árið.

$B_t$ er úrslitið hjá almenna geiranum í ár $t$, ið verður afturdiskonterað við rentuni $r$. $D_0$ er byrjanarstøddin á nettoskuldini hjá tí almenna við ársbyrjan í ár 0 (sum í hesum føri er 2018). $BTÚ_t$ er BTÚ í ár $t$, ið verður afturdiskonterað við rentuni, tað vil siga, nútíðarvirðið av framtíðar BTÚ. Sostatt lýsir haldførisávísin støddina á varandi broytingini (sum partur av BTÚ) í primeru saldo sum skal til fyri, at nettoskuldin ikki skal verða størri enn nútíðarvirðið á øllum framtíðar primeru fíggjaræltanaryvirskotum hjá almenna geiranum. Almenn nettoskuld fevnir um fíggjarliga ogn og skuld hjá landi, kommunum, sosialum grunnum og almennum partafeløgum. Nettoskuldin er øll fíggjarlig skuld frádrigið alla fíggjarliga ogn. Fíggjarliga ognin fevnir um tøkt gjaldføri og aðrar fíggjarognir, eisini hjá almennu partafeløgunum.

Nútíðarvirðið av framtíðar úrslitunum í framroknaða tíðarskeiðinum hjá almenna geiranum fevnir um úrslitið hjá landi, kommunum, sosialum grunnum og ríkisfyristing, men ikki almennum partafeløgum. Ein positivur ávísi merkir, at almennu inntøkurnar eru hægri enn almennu útreiðslurnar. Ein positivur haldførisávísi krevur ikki samsvar millum inntøkur og útreiðslur á hvørjum ári, men at tað er langtíðarjavnvág millum almennu inntøkurnar og útreiðslurnar.

Er haldførisávísin negativur, merkir tað, at almennu útreiðslurnar eru hægri enn inntøkurnar, og at hetta førir til almennan skuldarvøkstur yvir tíð. Ein negativur haldførisávísi førir sostatt til krøv um búskaparligar nýskipanir, um ikki ein versnan av vælferðartænastunum skal fara fram. Tað eigur tískil at vera ein politiskur málsetningur í sjálvum sær at føra ein fíggjarpolitikk, sum tryggjar fíggjarpolitiskt haldføri, ið merkir at javnvág er millum almennar inntøkur og útreiðslur fram í tíð. Hetta gevur støðufesti í búskapargongdini uttan vaksandi skuldarbinding og politisk inntriv (Búskaparráðið 2024).

Úrslitið fyri haldførisávísan í grundframlitinum í haldførisgreiningini er -9% av BTÚ. Haldførisávísin í støðisárinum lýsir árliga fíggarkravið, um fíggjarpolitisk tiltøk ikki verða framd í støðisárinum. Um eingi fíggjarpolitisk tiltøk verða sett í verk, veksur haldførisavbjóðingin, millum annað tí at rentutilskrivingarnar vaksa gjøgnum alt framrokningartíðarskeiðið.

# 2. Samlát

Í hesum kapitalinum verður hugt nærri at teimum ymisku samlátunum (simuleringunum), eitt nú hvussu makrobúskaparligir lyklavariablar broytast í framrokningini. Fyrst verður hugt at samansetingini í búfjøldini og støddini á arbeiðsfjøldini, síðan verður komið inn á gongdina í ymisku liðunum í veitingarjavnanum, og at enda verður hugt at almennu inntøkunum og útreiðslunum. Dentur verður serliga lagdur á at greiða frá grundframlitinum, og hvørjar fortreytir verða broyttar í alternativ framlitunum.

## 2.1 Grundframlit

Úrslitið fyri haldførisávísan í grundframlitinum frá haldførisgreiningini er -9% av BTÚ. Úrslitið stavar serliga frá alsamt vaksandi útreiðslunum, sum partur av BTÚ. Meira kann lesast um sjálvt úrslitið í haldførisgreiningini, sí Búskaparráðið (2024). Niðanfyri verður greitt nærri frá nøkrum av undirliggjandi orsøkunum til úrslitið.

### 2.1.1 Gongd í fólkasamanseting og arbeiðsvirkni

Fólkatalsframrokningin hjá Hagstovu Føroya og samtyktur pensjónsaldur (67,5 ár 2025, 68 í 2030 og restina av tíðarskeiðinum) liggja til grund fyri grundframlitnum. Gongdin í fólkatalinum í fólkatalsframrokningini vísir, at fyrstu árini veksur fólkatalið, men leggur seg síðan á eina rættiliga støðuga legu á umleið 58.000 fólk. Arbeiðsfjøldin, ið er arbeiðsvirkin og arbeiðsleys, veksur somuleiðis fyrstu árini, men fellur eftirfylgjandi, hóast fólkatalið veksur. Grundin er, at talið av fólki í arbeiðsvirknum aldri minkar, meðan barnatalið og serliga talið av pensjónistum veksur, ið eisini sæst aftur í vaksandi talinum av vinnuliga óvirknum.

**Búfjøld, arbeiðsfjøld og vinnuliga óvirkin Mynd 3.1.1a**




**Búskaparligur forsyrgjarabrøkur Mynd 3.1.1b**




Kelda: Landsbanki Føroya

Búskaparligi forsyrgjarabrøkurin lýsir sambandið millum talið av fólki á arbeiðsmarknaðinum og uttanfyri arbeiðsmarknaðin. Er forsyrgjarabrøkurin minni enn 1, merkir tað, at talið av fólki á arbeiðsmarknaðinum er størri enn talið av teimum, sum eru uttanfyri. Á mynd 3.1.1b sæst, at búskaparligi forsyrgjarabrøkurin veksur, so hvørt arbeiðsfjøldin minkar, meðan talið av vinnuliga óvirknum veksur. Tað vil siga, at tað gerast færri, sum skulu forsyrgja fleiri. Meira er at lesa um demografisku gongdina í Búskaparráðið (2024).

## 2.1.2 Makrobúskaparlig gongd

Makrobúskaparligi myndilin er mentur av Dream til Grønlendska búskapin, tískil eru makrobúskaparligir samanhangir og sambond tey somu sum í Hansen og Stephensen (2021b). Gongdin er tó øðrvísi, tí føroysk tøl verða nýtt.

Hesin langsýnti myndilin hevur fleksiblar prísir og lønir, ið merkir at ávirkanir á prísir og lønir sláa í gjøgnum beinanvegin, ið ger myndilin einfaldari. Eitt dømi um hetta frá haldførismyndlinum er, at so skjótt pensjónsaldurin verður hækkaður, og arbeiðsútboðið veksur, fellur reallønin. Hevði tað hinvegin verið ein stuttsýntur myndil, høvdu fortreytir um trekar prísir verið við í myndlinum. Fortreytirnar um fleksiblar prísir, merkja eisini, at haldførismyndilin er illa egnaður til at lýsa stutttíðar broytingar, og tí skulu stutttíðar broytingar tulkast við stórum varsemi. Í myndlinum verður sett sum fortreyt, at øll arbeiðsmegi er eins, og allar vinnugreinar eftirspyrja somu arbeiðsmegina.

Mynd 3.1.2 vísir ymisku liðirnir í veitingarjavnanum. Gongdin í reala BTÚ fylgir meira ella minni gongdini í arbeiðsfjøldini. Samband er millum løn og arbeiðsvirkni. Tá arbeiðsvirknið veksur fellur lønin og øvugt. Vaksandi arbeiðsvirkni fyrstu árini heldur lønini niðri samanborið við byrjanarpunktið. Arbeiðsvirknið fellur eftirfylgjandi restina av framrokningartíðarskeiðinum, ið eisini sæst aftur í reallønini og privatu nýtsluni.

Íløgurnar minka yvir tíð, sum liður í at fyritøkurnar niðurskriva kapitaltólið, orsakað av fallandi arbeiðsvirkni.

Fyrstu árini veksur innflutningurin, tí at eftirspurningurin frá húsarhaldunum eftir vørum veksur. Við tíðini førur minkandu virksemið hjá fyritøkunum til, at innflutningurin til tilfarsnýtslu og íløgur minkar. Hækkandi innlendis prísstøðið dregur eftirspurningin eftir útlendskum vørum upp, men ávirkanin av Minkandi virkseminum hjá fyritøkunum er størri, og dominerar tískil. Útlendskir prísir eru eksogenir í myndlinum, og tískil vilja ongar prísávirkanir stava frá innflutninginum.

Útflutningurin fellur yvir tíð, ið stavar frá fallandi virksemi.

## Veitingarjavnin í realum virðum

**Mynd 3.1.2**

**BTÚ** — **Mynd 3.1.2a**




**Privat nýtsla** — **Mynd 3.1.2b**




**Almenn nýtsla** — **Mynd 3.1.2c**




**Íløgur** — **Mynd 3.1.2d**




**Útflutningur** — **Mynd 3.1.2e**




**Innflutningur** — **Mynd 3.1.2f**




Kelda: Landsbanki Føroya

## 2.2 Gongd í inntøkum og útreiðslum

Gongdin í almennu inntøkunum fylgir í stóran mun gongdini í BTÚ. Størsti parturin av almennu inntøkunum, stava frá inntøkuskattum. Inntøkurnar frá inntøkuskatti eru rættiligani støðugar sum partur av BTÚ, tó er ein lítil vøkstur at hóma, sí mynd 3.1.3. Á myndini sæst, at tveir stoytir koma, tá ið pensjónsaldurin verður hækkaður í 2025 og 2030. Búskapurin hevur brúk fyri tíð at finna nýggja líkavekt eftir stoytirnar, ið sæst sum stuttíðarsveiggj í inntøkuskattinum. Stutttíðarbroytingarnar skulu tí tulkast við varsemi.

Ríkisveitingin var í 2018 góðar 640 mió. kr., og tað er hon sett at vera í øllum framrokningartíðarskeiðinum (frá 2015 til 2023 var upphæddin á ríkisveitingini fastfryst). Tað merkir, at ríkisveitingin minkar sum prosent av BTÚ við tíðini, sí mynd 3.1.3. Í 2024 minkaði ríkisveitingin við 25 mió. kr. og skal eftir ætlan fella fram til 2026, tá ríkisveitingin eftir ætlan verður góðar 540 mió. kr. Tað er ikki tikin hædd fyri, at ríkisveitingin fellur í haldførismyndlinum.

Inntøkurnar frá produktskattum, øðrum refusiónum úr Danmark umframt aðrar inntøkur, liggur rættiliga støðugt í mun til BTÚ alt tíðarskeiðið.

**Inntøkur hjá tí almenna 2018-2062** **Mynd 3.1.3**




Kelda: Landsbanki Føroya

Á mynd 3.1.4 sæst, at størsti parturin av útreiðslunum hjá almenna geiranum fara til nýtslu. Harumframt fer stórur partur til almannaveitingar. Útreiðslurnar til nýtslu og serliga almennaveitingar blíva ein alsamt vaksandi partur av BTÚ yvir framroknaða tíðarskeiðið. Útreiðslurnar til íløgur og annað eru ein støðugur partur av BTÚ.

Nýtsluútreiðslurnar vaksa millum annað orsakað av, at útreiðslurnar til einstaklinga nýtslu vaksa, sí mynd 3.1.5a-b. Harumframt vil vaksandi talið av pensjónistum økja um útreiðslurnar til almannaveitingar.

**Útreiðslur hjá tí almenna 2018-2062** **Mynd 3.1.4**




Kelda: Landsbanki Føroya

Á mynd 3.1,5a sæst, at einstaklinga nýtsluútreiðslurnar vaksa yvir tíðarskeiðið, ið er framroknað. Útreiðslurnar til heilsu og aldurdóm eru høvuðsorsøk til vøksturin. Einstaklingaútreiðslur til heilsu og aldurdóm vaksa við aldrinum, sí í mynd 2.1.6 og 2.1.8. Hetta saman við vaksandi talinum av eldri, ger at samlaðu útreiðslurnar vaksa. Størsti parturin av einstaklinga nýtsluni fer til heilsu, meðan parturin sum fer til aldurdóm hevur størstan vøkstur, sí mynd 3.1.5a og 3.1.5b.

**Einstaklinga nýtsluútreiðslur** **Mynd 3.1.5a**




**Einstaklinga nýtsluútreiðslur** **Mynd 3.1.5b**




Kelda: Landsbanki Føroya

Á mynd 3.1.6a og b sæst gongdin í almennu inntøkunum og útreiðslunum, umframt primeru saldoini fyri grundframlitið. Myndin vísir, at gjógvin millum almennu inntøkurnar og útreiðslurnar veksur yvir tíðarskeiðið, tí at almennu útreiðslurnar vaksa frá inntøkunum. Hetta hevur við sær, at úrslitið fyri primeru saldoina versnar alt tíðarskeiðið. Hóast tað almenna hevur eina nettoogn í byrjanarárinum, er

avleiðingin av skjótt vaksandi undirskotunum, at fíggjarpolitiska haldførið er sera vánaligt. Í grundframlitinum er haldførisávísin -9% av BTÚ.

**Almennar inntøkur og útreiðslur** **Mynd 3.1.6a**




**Primer saldo, % av BTÚ** **Mynd 3.1.6b**




## 2.3 Alternativ framlit

Í frágreiðingini Fíggjarpolitiskt haldføri[18] vórðu fýra alternativ framlit gjørd. Alternativu framlitini høvdu til endamáls at kanna ávirkanina av útvaldum fíggjarpolitiskum broytingum og kanna ávirkanina av ávísum fortreytum á úrslitið.

### 2.3.1 Hækka pensjónsaldurin ½ ár fimta hvørt ár

Fyrsta alternativ framlitið hevur til endamáls at kanna ávirkanina av einari hækking av pensjónsaldrinum á ½ ár fimta hvørt ár. Hetta er hámarksferðin í verandi lóg. Hækkingin í pensjónsaldrinum verður myndlað umvegis eitt alternativ samlát av íbúgvaroknskapinum, har sosiobúskaparliga støðan verður broytt hjá teimum, sum verða ávirkaði av, at pensjónsaldurin hækkar í einstøku árunum, sí part 2.1.1 og mynd 2.1.2c.

Broytingin í pensjónsaldrinum ger millum annað, at arbeiðsútboðið veksur og tað betrar um búskaparliga forsyrgjarabrøkin samanborið við grundframlitið, sí mynd 3.2.1b. Harumframt minka útreiðslurnar til almannaveitingar.

[18] Búskaparráðið (2024)

**Búfjøld, arbeiðsfjøld og vinnuliga óvirkin Mynd 3.2.1a**




**Búskaparligur forsyrgjarabrøkur Mynd 3.2.1b**




Kelda: Landsbanki Føroya

Á mynd 3.2.2a og b sæst gongdin í almennu inntøkunum og útreiðslunum, umframt primeru saldo. Myndin vísir, at almennu útreiðslurnar framvegis eru størri enn inntøkurnar, ið merkir undirskot á primeru saldoini. Hækkingin í pensjónsaldrinum á ½ ár tykist at steðga vaksandi undirskotinum, men er ikki nokk til at venda gongdini. Haldførisávísin er -4% av BTÚ, sum er ein betran á 5%-stig í mun til grundframlitið.

**Almennar inntøkur og útreiðslur Mynd 3.2.2a**




**Primer saldo, % av BTÚ Mynd 3.2.2b**




Kelda: Landsbanki Føroya

## 2.3.2 Hækka pensjónsaldurin 1 ár fimta hvørt ár

Næsta alternativa framlitið hevur til endamáls at kanna ávirkanina av einari størri hækking av pensjónsaldrinum á 1 ár fimta hvørt ár. Eins og í fyrsta alternativa framlitinum, verður hækkingin í pensjónsaldrinum myndlað umvegis eitt alternativt samlát av íbúgvaroknskapinum, har sosiobúskaparliga støðan verður broytt hjá teimum, sum verða ávirkaði av, at pensjónsaldurin hækkar í einstøku árunum, sí part 2.1.1 og mynd 2.1.2d. Broytingin í pensjónsaldrinum ger millum annað tað, at

arbeiðsútboðið veksur so mikið nógv, at gongdin í búskaparliga forsyrgjarabrøkinum vendur, og tað gerast við tíðini lutfalsliga fleiri fólk í arbeiðsfjøldini í mun til tey vinnuliga óvirknu, sí mynd 3.2.3a og b.

**Búfjøld, arbeiðsfjøld og vinnuliga óvirkin Mynd 3.2.3a**




**Búskaparligur forsyrgjarabrøkur Mynd 3.2.3b**




Kelda: Landsbanki Føroya

Á mynd 3.2.4a og b sæst gongdin í almennu inntøkunum og útreiðslunum, umframt primeru saldo. Myndin vísir, at við at hækka pensjónsaldurin 1 ár fimta hvørt ár, tykist vaksandi undirskotið at steðga og gongdin at venda. Haldførisávísin er -1% av BTÚ, sum er ein betran á 8%-stig í mun til grundframlitið.

**Almennar inntøkur og útreiðslur Mynd 3.2.4a**




**Primer saldo, % av BTÚ Mynd 3.2.4b**




Kelda: Landsbanki Føroya

## 2.3.3 Seta nettofráflyting til null

Í triðja alternativ framlitinum verður ein viðkvæmisgreining av fíggjarpolitiska haldførinum í mun til nettofráflyting gjørd. Í mun til grundframlitið, ið hevur eina árliga nettofráflyting, verður nettofráflytingin sett til 0. Hetta verður myndlað umvegis liðin fyri nettotilflyting í formyndlinum fyri

fólkatalsframrokningina, sí part 2.1.1 og mynd 2.1.1b. Føðitíttleiki og deyðatíttleiki eru óbroytt í mun til grundframlitið. Harumframt eru vektirnar í íbúgvaroknskapinum óbroyttar í mun til grundframlitið.

Gongdin í búfjøld, arbeiðsfjøld og vinnuliga óvirknum minnir mest um gongdina í grundframlitinum. Men vaksandi fólkatalið, serliga av fólki í arbeiðsførum aldri, ger, at lutfallið millum arbeiðsfjøld og vinnuliga óvirkin batnar samanborið við grundframlitið.

**Búfjøld, arbeiðsfjøld og vinnuliga óvirkin Mynd 3.2.5a**




**Búskaparligur forsyrgjarabrøkur Mynd 3.2.5b**




Kelda: Landsbanki Føroya

Á mynd 3.2.6a og b sæst gongdin í almennu inntøkunum og útreiðslunum, umframt primeru saldo. Myndin vísir, at gjógvin millum almennu inntøkurnar og útreiðslurnar veksur yvir tíðarskeiðið, tí at almennu útreiðslurnar vaksa frá inntøkunum. Hetta hevur við sær, at úrslitið á primeru saldoini versnar alt tíðarskeiðið. Haldførisávísin er -8% av BTÚ, sum er ein betran á 1%-stig í mun til grundframlitið.

**Almennar inntøkur og útreiðslur Mynd 3.2.6a**




**Primer saldo, % av BTÚ Mynd 3.2.6b**




Kelda: Landsbanki Føroya

## 2.3.4 Einstaklingakostnaður til aldurdóm fellur 20%

Síðsta alternativ framlitið hevur til endamáls at lýsa ávirkanina á fíggjarpolitiska haldførið, um einstaklingakostnaðurin til aldurdóm fellur við 20% linjurætt yvir 40 ár í mun til grundframlitið. Hetta verður myndlað umvegis formyndilin fyri einstaklingakostna til aldurdóm, sí part 2.1.2.

**Einstaklinga útreiðslur til aldurdóm** **Mynd 3.2.7**




Ein nýggjur útreiðsluprofilur verður gjørdur, sum í støðisárinum byrjar á sama stigi, sum í grundframlitinum, men við tíðini lækkar og endar á einum stigi, sum er 20% lægri enn í grundframlitinum. Einstaklingakostnaðurin í alternativa framlitinum minkar eisini orsakað av fortreytini um heilsugóða elli eins og í grundframlitinum, sí mynd 3.2.7.

**Einstaklinga nýtsluútreiðslur** **Mynd 3.2.8a**




**Einstaklinga nýtsluútreiðslur** **Mynd 3.2.8b**

*Til aldurdóm yvir tíð*




Kelda: Landsbanki Føroya

Á myndini sæst at hóast einstaklinga útreiðslurnar gerast lægri, í mun til grundframlitið, vaksa útreiðslurnar til aldurdóm framvegis yvir framroknaða tíðarskeiðið. Grundin er, at talið av 80+ ára gomlum meir enn tvífaldast frá 2023 til 2060. Eftir at fólk gerast áleið 80 ár byrja einstaklinga útreiðslurnar til aldurdóm at hækka munandi.

Á mynd 3.2.8a og b sæst gongdin í almennu inntøkunum og útreiðslunum, umframt primeru saldo. Myndin vísir, at hóast útreiðslurnar til aldurdóm ikki veksa í sama sum í grundframlitinum, er hetta ikki nóg mikið til at venda gongdini. Haldførisávísin er -8% av BTÚ, sum er ein betran á 1%-stig í mun til grundframlitið.

**Almennar inntøkur og útreiðslur** **Mynd 3.2.9a**




**Primer saldo, % av BTÚ** **Mynd 3.2.9b**




Kelda: Landsbanki Føroya.

# 3. Avmarkingar og fyrivarni

Búskapargreiningar, sum røkka langt inn í framtíðina, eru fevndar av stórari óvissu. Óvissan veksur jú longri framrokningartíðarskeiðið er. Sum nevnt, er fyrsta útgávan av haldførismyndlinum framvegis undir menning, og tað eru enn fleiri økir, sum kunnu víðarimennast. Í fyrstu atløgu er dentur lagdur at innsavna dátur, kanna ávirkanir av fólkatalsframrokningum og at menna formyndlarnar, sum umboða føroysk samfelagsviðurskifti. Smærri tillagingar eru gjørdar í makrobúskaparliga myndlinum, men í stóran mun er myndilin óbroyttur í mun til tann grønlendska. Arbeitt verður við at víðari menna makromyndilin og betra formyndlarnir so hvørt sum nýggj hagtøl gerast tøk. Í hesum brotið verður komið inn á útvaldar avmarkingar, fyrivarni og økir, ið skulu víðarimennast.

**Avmarkað persónsskrá**: Formyndlarnir gerast avmarkaðir, tí persónsskráin (registerdata) er avmarkað innan fleiri økir. Hevði ein persónsskrá verið við upplýsingum um t.d. hægstu gjøgnumførdu útbúgving hjá hvørjum einstaklingi, hevði hon kunnað betrað munandi um formyndlarnar við millum annað hagtølum um útbúgvingarstøði, tilknýti til arbeiðsmarknaðin og einstaklinga nýtslu. Manglandi hagtøl um útbúgvingarstøði hjá búfjøldini, og samanhangin millum útbúgvingarstøðið og tilknýtið til arbeiðsmarknaðin, er grundin til, at eingin útbúgvingarframrokning er framd á hesum sinni. Tað vil siga, at íbúgvaroknskapurin er ikki treytaður av útbúgvingarstøðinum í myndlinum.

**Veikleikar í mun til kalibrering:** Framrokningin byggir á ein myndil, ið er kalibreraður til eitt ávíst ár, og ikki á eina hagfrøðiliga framrokning útfrá søguligum tíðarserium. Endogenu parametrarnir í myndlinum verða kalibreraðir, soleiðis at myndilin endurskapar eina líkavekt í búskapinum í støðisárinum, og teir verða síðani settir fastir alt framrokningartíðarskeiðið. Best hevði verið um kalibreringin var bygd á strukturel virði fyri at minka um ávirkanina av konjunkturum og øðrum frávikum.

**Abnormalitetir í støðisárinum:** Almenni geirin fekk í 2018 inntøkur frá bæði forskatting og eftirskatting av pensjón, ið merkir, at inntøkurnar eru hægri, enn hvat væntast kann í framtíðini, tá eftirskattingin verður alsamt minni partur av almennu inntøkunum. Inntøkurnar frá tøku- og veiðugjøldum vóru lægri enn vanligt í 2018.

**Fólkatalsframrokning**. Gongdin í fólkatalinum og samansetingini í búfjøldini hevur stóra ávirkan á úrslitið á haldførisávísanum. Tað er tí avgerandi, at fortreytirnar handan fólkatalsframrokningina eru rættvísandi og at viðkvæmisgreiningar verða gjørdar av teimum.

Nógv hevur verið umrøtt, hvørt fortreytin um eina nettofráflyting á hvørjum árið er rættvísandi. Av somu grund er gjørd ein viðkvæmisgreining við eini nettofráflyting á null, og tað eiga at vera gjørdar fleiri viðkvæmisgreiningar frameftir. Seinnu árini er talið av útlendingum, sum eru fluttir til Føroya, vaksið munandi. Talan er í stóran mun um útlendska arbeiðsmegi. Hetta er ein grundleggjani broyting í nettotilflytingini. Tí verður neyðugt frameftir, tá fólkatalsframrokningar verða framdar, ikki einans at hyggja at kyni og aldri, men eisini at etnisiteti og í hvørjum sambandi til og fráflyting stavar frá.

Føðitíttleikin er ein onnur fortreyt, ið hevur ávirkan á haldførisávísan. Lutfalsliga stutti modelleraði tíðarkarmurin á 40 ár, hevur tí óhepnu effekt, at ein høgur føðitíttleiki vernsar um fíggarpolitiska haldførið í myndlinum, meðan ein lágur føðitíttleiki hevur positiva effekt. Vegna stutta tíðarkarmin nær effektin av, at tað gerast fleiri børn, sum skulu forsygjast, at sláa í gjøgnum, meðan effektin av, at tað við tíðini gerast fleiri í arbeiðsførum aldri, ikki nær at sláa eins væl í gjøgnum. Ein loysn kundi verið, at longt tíðarkarmin á fólkatalsframrokningini til 80 ár. Ein longdur tíðarkarmur, har framrokningin fevnur um næstan 3 ættarlig, hevur tó stórar óvissur við sær. Bæði tí at stórur partur av búfjøldini í ár 2100 ikki er fødd enn, og tí at føroyska búfjøldin er lítil og søguliga hevur sveiggjað nógv í stødd, serliga orsakað flytførinum hjá búfjøldini.

Søguliga hevur føðitíttleikin verði høgur. Tí er føðitíttleikin í fólkatalsframrokningini, sum er grundaður á søguliga føðitíttleikan, relativt høgur. Seinastu árini hevur føðitíttleikin verið fallandi. Tað er enn ringt at meta um talan er um eina stukturella broyting. Føðitíttleikin í flest øðrum vestligum londum hevur verið fallandi í mong ár, tí er ikki ósannlíkt at føroyski føðitíttleikin í framtíðini verður lægri enn tann søguligi. Føðitíttleikin er tískil helst yvirmettur.

**Einstaklinga kostnaður:** Á fleiri økjum mangla hagtøl fyri at gera tað møguligt at aldursbýta einstaklingaútreiðslurnar. Tað hevur við sær, at í summum førum byggir einstaklinga kostnaðurin á ymiskar fortreytir, heldur enn hagtøl. Eitt dømi er, at einstaklinga kostnaðurin til heilsuútreiðslur er grundaður á danskan einstaklinga kostnað vegna manglandi dátur.

**Inntøkan hjá húsarhaldinum:** Øll arbeiðsvirkin hava somu løn og arbeiða líka nógv sum miðal løntakarin. Hetta kann eitt nú vera við til at undirmeta effektina av at hækka pensjónsaldurin, tí at tey sum eru um pensjónsaldur vanliga eru á hægsta lønarstigi. Ætlanin er at gera eina neyvari modellering av lønarinntøku.

**Geirabýti:** Í haldførismyndlinum verður almenni geirin lýstur undir einum. Tað vil siga, at skilt verður ikki í millum land, kommunur, sosialar grunnar og ríkið. Tað ber sostatt ikki til at nágreina í haldførismyndlinum, um tað verður landskassin ella kommunukassanir, sum hava tær størstu avbjóðingarnar fyri framman. Ætlanin er at býta almenna geiran sundur, soleiðis at møguleiki verður at greina millum annað landskassa og kommunur hvør sær.

**Búskaparmyndilin hevur ikki nakra fíggjarpolitiska reaktiónsfunktión:** tað merkir at búskapargongdin ikki verður fíggjað. Gongdin í primeru saldo kann tískil verða lýst sum væntanir, tá ið fíggjarpolitisk átøk ikki verða framd leypandi. Meira neyvt merkir tað, at í tí føri, tá ið haldførisávísin er negativur, er tað myndlatekniskt loyvt, at almenni geirin upphópar skuld. Haldførisávísin lýsir sostatt ikki tí mest sannlíku gongdina, men vísir hinvegin avleiðingarnar fyri almenna fíggjarstandin, um eingin fíggjarpolitisk átøk verða framd, sí Hansen og Stephensen (2021b).

í myndlinum er fólkatalsframrokningin eksogen í mun til makrobúskaparliga myndilin. Tað merkir, at fólkatalið ávirkar makrobúskapin, men makrobúskapurin ávirkar ikki fólkatalið. Við øðrum orðum hevur eitt framhaldandi vaksandi undirskot og skuld hjá tí almenna ikki ávirkan á nettofráflytingina í hesi útgávuni av myndlinum. Søguliga hevur nettofráflytingin tó verið nógv stýrd av búskapargongdini, og tí

er fortreytin um eksogena nettofráflyting ikki sannlík. Hetta undirmetir helst avleiðingarnar av vantandi fíggjarpolitiskum haldføri.

**Pensjónir og mótrokning:** Skattainntøkur frá eftirlønum eru grundaðar á 2018 støðið. Í 2018 var tvungna eftirlønaruppsparingin 4% av inntøkuni, tá var skatturin av eftirlønarinngjøldum 352 mió. kr. Eftirlønaruppsparingin hækkar 1%-stig um árið, inntil 2026, tá verður hon 12%. Í 2023 var tvungna eftirlønaruppsparingin 9%, og tá vóru inntøkurnar frá eftirlønarskattinum til samanbering 518 mió. kr.[19] Havandi í huga, at tvunga eftirlønir fer upp á 12% í 2026, so er greitt, at inntøkurnar frá forskattingini av eftirlønarinngjøldum, alt annað líka, verða munandi hægri í framtíðini, enn tær vóru í 2018. Tað er tó umráðandi at viðmerkja, at hóast tvungna eftirlønin einans var 4% í 2018, so vóru partar av arbeiðsmarknaðinum, m.a. størsti parturin av starvsfólkunum í almenna greinum, sum frammanundan spardu upp til egna eftirløn.

Ímeðan inntøkurnar frá forskattingini av eftirlønarinngjøldum eru undirmettar, eru inntøkurnar frá eftirskatting av eftirløn í 2018 ov høgar, tí hesar minka við tíðini so hvørt parturin, sum er uppspardur undir gomlu skipanini minkar.

Mótrokningin av fólkapensjón er ikki beinleiðis myndla í haldførismyndlinum. Tó er mótrokningin óbeinleiðis við, tí at allar almennar inntøkur og útreiðslur frá 2018 eru nýttar og tá bleiv eisini mótroknað í fólkapensjónini. Í 2018 vóru egininntøkur omanfyri 60.000 mótroknaðar við 60% í viðbótini. Í 2020 var mótrokingin broytt, soleiðis at hon varð 20% og mótrokningarfría upphæddin 45.000 kr. í 2024 varð mótrokingarfría upphæddin hækkað til 61.900 kr. Í 2014 tá fyrsti partur av pensjónsnýskipanini var settur í gildi varð ásett, at tey sum spara upp til eftirløn undir nýggju skipanini kunnu, tá ið tey fara á pensjón, fáa 15% út í kapitaleftirløn og minst 45% skulu í lívrentu, tað sum ikki fer til lívrentu ella kapitalpensjón fer í ratueftirløn. Tann parturin av eftirlønini, sum eru leypandi útgjaldingar, tað vil siga, ratueftirløn og lívrenta, verður mótroknað við 20% í grundupphæddini og síðan 25% í viðbótini. Tey sum hava eina eftirlønaruppsparing sum er spard saman innan 2014, hava í stóran mun bert samanspart kapitalpensjón. Grundin er, at undir gomlu skipanini, kundu tey spara 50.000 kr um árið í kapitalpensjón, tískil er tað ein stórur partur av fólkinum, sum einans hevur kapitalpensjón. Kapitalpensjónin verður útgoldin í einum, og kann ikki mótroknast í fólkapensjónini. Alt annað líka, merkir tað, at við tíðini so hvørt parturin av eftirløn sum er spardur saman undir nýggju skipanini verður størri, kann meira mótroknast í fólkapensjónini. Tó førir mótrokningarfría upphæddin á 61.900 við sær, at einki verður mótroknað fyrrenn mánaðarliga egininntøkan fer uppum góðar 5.000 kr.

Omanfyri nevndu viðurskiftir hava týdning fyri haldføri og eiga at verða kannaði nærri. Til tað krevst ein serstakur eftirlønarmyndli fyri at gera meira nágreiniligar metingar hesum.

**Broytingar frá støðisárinum, ið ikki er tiknar við á hesum sinni:**

- Lógin um veiðugjald og tøkugjald er broytt síðan 2018. Tað verður í hesi útgávuni ikki tikin hædd fyri hvørja ávirkan broytingarnar í lógunum, høvdu haft á almennu inntøkurnar.

[19] Vøksturin í skattinum frá eftirlønarinngjøldum stavar ikki einans frá at eftirlønarprosentið er vaksið, men skyldast eisini lønarvøkstur og at stavrsfólkatalið í Føroyum er vaksið í tíðarskeiðinum.

- Ríkisveitingin lækkar 25 mió. kr. um árið frá frá 2023 til 2026. Tað er ikki tikin hædd fyri lækking í ríkisveitingini í haldførismyndlinum, hinvegin er støddin á ríkisveitingin fastfryst frá 2018, tað vil siga at hon veksur ikki við inflatión og produktivitetsvøkstri.

**Óvissur í mun til haldførisávísan:** Haldførisávísin kann broytast frá ári til ár. Millum annað vil eitt nýtt støðisár, broyting í fólkatalsframrokningini og fríggjarpolitiskar broytingar hava ávirkan á úrslitið á haldførisávísanum. Tað kann sostatt væntast, at so hvørt sum haldførismyndilin verður víðarimentur og dagførdur, fer úrslitið at broytast. Tað vil siga, at niveau munir í úrslitunum kunnu væntast frameftir, men so leingi eingin umfatandi fíggjarpolitisk broyting verður framd, vil úrslitið framvegis týða á, at almenni geirin stendur fyri eini haldførisavbjóðing. Haldførisávísin gevur ábending um, hvørjari kós verandi fíggjarpolitikkur er á, og skal ikki tulkast sum ein neyv forsøgn um framtíðina.

# Útgangur

Haldførismyndilin er partur av amboðskassanum hjá Búskaparráðnum og verður nýttur til greiningararbeiði og til at meta um tørvin á búskaparligum átøkum og nýskipanum. Í hesum tekniska arbeiðsnotatinum hava vit lýst dátugrundarlagið og yvirkskipaða bygnaðin av nýggja haldførismyndlinum hjá Búskaparráðnum. Tað vil siga myndlaskipan, dátutilfar, tekniskar avgerðir, avmarkingar, umframt eitt sindur av ástøði, sum liggur aftanfyri makrobúskaparliga myndilin.

Haldførismyndilin er ein samansett myndlaskipan, har høvuðsluturin í myndlaskipanini er makrobúskaparligi myndilin, sum er fingin til vega frá DREAM. Í fyrstu útgávuni eru einans fáar broytingar gjørdar í makrobúskaparliga myndlinum, meðan dentur er lagdur á at menna føroyskar formyndlar og veita best møguliga dátugrundarlagið til útrokningina.

Búskapargreiningar, sum røkka langt inn í framtíðina, eru fevndar av stórari óvissu. Av óvissum og manglum kunnu nevnast óvissur um tøkni og tøknilig frambrot, til- og fráflyting hjá búfjøld, føðitíttleika, arbeiðsvirkni hjá teimum eldru, og hvørja ávirkan øktur miðal livialdur kann fáa á heilsuútreiðslurnar. Jú longri tíðarkarmurin er, tess størri gerast óvissurnar. Úrslitini frá haldførismyndlinum skulu tí ikki tulkast sum neyvar forsagnir um framtíðina. Úrslitini eru sum nevnt ein ábending um kósina á førda fíggjarpolitikkinum undir ymsum framlitum.

Myndlaskipanin í haldførismyndlinum er framvegis undir menning. Miðað hevur verið eftir, at hendan fyrsta útgávan av haldførismyndlinum, er so einføld sum til ber. Útrokningar av fíggjarpolitiska haldførinum er ógvuliga umfatandi, og tí er raðfest, hvørji øki skuldi greinast og viðgerðast í fyrsta umfari. Tað merkir eisini, at onkur økir, sum eru viðkomandi í samband við haldførisgreiningina eru frávald av myndla- og datatøkniskum orsøkum. Talan er tískil ikki um ein lidnan myndil, men eina myndlaskipan og fakøki innan langsýntar búskaparligar greiningar, sum er undir menning í Landsbankanum.

Haldførismyndilin er eitt stig á leiðini at gera grundaðar og samanberiligar langsýntar greiningar av fíggjarpolitiska haldførinum møguligar.

# Keldulisti

Almannaverkið

Samhaldsfasti

Arnbjerg S., Bjørner T.B. 2010, Sundhedsudgifter og levetid, Nationaløkonomisk Tidsskrift Vol. 148

Búskaparráðið 2024, *Fíggjarpolitiskt haldføri, temafrágreiðing*

Búskaparráðið 2019, *Búskaparráðsfrágreiðingin á heysti* 2019

Búskaparráðið 2015, *Búskaparráðsfrágreiðingin á vári* 2015

Danmarks Statistik

Danmarks Statistik 2012, *ADAM – en model af dansk økonomi.* Marts 2012.

Deloitte

Det Økonomiske Råd 2020, Dansk økonomi efterår 2020, Kapitel III Finanspolitisk holdbarhed

DREAM 2008, DREAM dokumentation, https://dreamgruppen.dk/publikationer/2008/april/dream-dokumentation

Hansen M. F. 2021, *Økonomisk model for Grønland, Teknisk dokumentation og afviklingsvejledning*, DREAM

Hansen M. F., Stephensen, P. 2021a, *Struktur-model for Grønland 2022 (v0.20),* DREAM.

Hansen M. F., Stephensen, P. 2021b, *Økonomisk fremskrivning for Grønland: Vurdering af de fremtidige perspektiver for de offentlige finanser og den finanspolitiske holdbarhed*, DREAM

Hansen. Z. H. 2021, *Fremskrivning af befolkningens arbejdsmarkedstilknytning, Socioøkonomisk fremskrivning*, DREAM

Hansen. Z. H. et al 2022, *Langsigtet økonomisk fremskrivning 2021: Vurdering af den finanspolitiske holdbarhed*, DREAM

Hansen. Z. H. et al 2023, *Langsigtet økonomisk fremskrivning 2022: Vurdering af den finanspolitiske holdbarhed,* DREAM

Finansministeriet

Fíggjarmálaráðið, Pensjónsnýskipan 2009, Uppskot til eina haldføra pensjónsskipan fyri Føroyar

Gjaldsstova Føroya

Hagstova Føroya

Kjellberg J., Ibsen R. 2020, Fremtidens sundhedsudgifter – en analyse af sund aldring, “steeping” og teorien om alder om “red herring”, VIVE (Det nationale forskrings- og analysecenter for velfærd)

Landsfólkayvirlitið

Norðoya bú- og heimatænasta

Petersen, T. W. 1997, *Introduktion til CGE-modeller*, Danmarks statistik

Roðin

Satistisk Sentralbyrå

Studni, 2022. Føroyingar á hægri útbúgvingum í FO og uttanlands, februar 2022

Studni, 2022. Hvussu nógv koma heimaftur, januar 2022

TAKS

Tórshavnar kommuna

Undirvísingarstýrið

UNESCO

Uttanríkis- og mentamálaráðið 2022, Í góðum hondum

Útlendingastovan

Økonomi og indenrigsministeriet 2017, Fordeling og incitamenter

# Yvirlit yvir talvur og myndir


| | |
|---|---|
| Mynd 2.1.1 | Myndlaskipanin |
| Mynd 2.1.2 | Fólkatalsframrokning |
| Mynd 2.1.3a | Framroknað fólkatal |
| Mynd 2.1.3b | Nettotilflyting |
| Mynd 2.1.3c | Føðitíttleiki |
| Mynd 2.1.3d | Yvirlivingartíttleiki |
| Talva 2.1.1 | Íbúgvaroknskapur |
| Mynd 2.1.4a | 2024 Íbúgvaroknskapur – Samtyktur pensjónsaldur |
| Mynd 2.1.4b | 2060 Íbúgvaroknskapur – Samtyktur pensjónsaldur |
| Mynd 2.1.4c | 2060 Íbúgvaroknskapur – Pensjónsaldurin hækkar hálvt ár, 5. hvørt ár |
| Mynd 2.1.4d | 2060 Íbúgvaroknskapur – Pensjónsaldurin hækkar 1 ár, 5. hvørt ár |
| Mynd 2.1.5 | Aldursbýttur vinnutíttleiki, í árstali |
| Talva 2.1.3 | Almennar inntøkur 2018, mió. kr. |
| Talva 2.1.4 | Almennar útreiðslur 2018, býtt á COFOG, mió. kr. |
| Talva 2.1.5 | Almennar útreiðslur, býtt á COFOG, mió. kr. |
| Talva 2.1.6 | Einstaklinga útreiðslur |
| Mynd 2.1.6 | Aldursbýttar nýtsluútreiðslur til heilsu |
| Mynd 2.1.7 | Aldursbýttar nýtsluútreiðslur til útbúgving |
| Mynd 2.1.8 | Aldursbýttar nýtsluútreiðslur til almannamál |
| Talva 2.1.7 | Aldur á kostnaðarprofili við heilsugóðari ellu |
| Mynd 2.1.9a | Einstaklinga útreiðslur til heilsu |
| Mynd 2.1.9b | Einstaklinga útreiðslur til aldurdóm |
| Mynd 2.2.1 | Samvirknaður í myndlinum |
| Mynd 2.2.2 | Nýtsla av myndli |
| Mynd 2.2.3 | Samansett CES-funktión |
| Talva 2.2.1 | Parameturvirðir í búskaparmyndlinum |
| Mynd 3.1.1a | Búfjøld, arbeiðsfjøld og vinnuliga óvirkin |
| Mynd 3.1.1b | Búskaparligur forsyrgjarabrøkur |
| Mynd 3.1.2 | Veitingarjavnin í realum virðum |
| Mynd 3.1.2a | BTÚ |
| Mynd 3.1.2b | Privat nýtsla |
| Mynd 3.1.2c | Almenn nýtsla |
| Mynd 3.1.2d | Íløgur |
| Mynd 3.1.2e | Útflutningur |
| Mynd 3.1.2f | Innflutningur |
| Mynd 3.1.3 | Inntøkur hjá tí almenna 2018-2062 |
| Mynd 3.1.4 | Útreiðslur hjá tí almenna 2018-2062 |
| Mynd 3.1.5a | Einstaklinga nýtsluútreiðslur |
| Mynd 3.1.5b | Einstaklinga nýtsluútreiðslur – Aldurdómur og heilsa |

| | |
|---|---|
| Mynd 3.1.6a | Almennar inntøkur og útreiðslur |
| Mynd 3.1.6b | Primer saldo, % av BTÚ |
| Mynd 3.2.1a | Búfjøld, arbeiðsfjøld og vinnuliga óvirkin |
| Mynd 3.2.1b | Búskaparligur forsyrgjarabrøkur |
| Mynd 3.2.2a | Almennar inntøkur og útreiðslur |
| Mynd 3.2.2b | Primer saldo, % av BTÚ |
| Mynd 3.2.3a | Búfjøld, arbeiðsfjøld og vinnuliga óvirkin |
| Mynd 3.2.3b | Búskaparligur forsyrgjarabrøkur |
| Mynd 3.2.4a | Almennar inntøkur og útreiðslur |
| Mynd 3.2.4b | Primer saldo, % av BTÚ |
| Mynd 3.2.5a | Búfjøld, arbeiðsfjøld og vinnuliga óvirkin |
| Mynd 3.2.5b | Búskaparligur forsyrgjarabrøkur |
| Mynd 3.2.6a | Almennar inntøkur og útreiðslur |
| Mynd 3.2.6b | Primer saldo, % av BTÚ |
| Mynd 3.2.7 | Einstaklinga nýtsluútreiðslur til aldurdóm |
| Mynd 3.2.8a | Einstaklinga nýtsluútreiðslur |
| Mynd 3.2.8b | Einstaklinga nýtsluútreiðslur til aldurdóm yvir tíð |
| Mynd 3.2.9a | Almennar inntøkur og útreiðslur |
| Mynd 3.2.9b | Primer saldo, % av BTÚ |

Landsbanki Føroya 2024